FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

Uppskot til samtyktar ... 2
Inngangur ... 7
Lýsing av búskaparstøðu og verandi gongd ... 8
Altjóða bakstøði ... 14
Almenn fíggjarmál ... 16
Uppskotið til játtanarkarmar ... 19
Uppskotið til játtanarkarmar býtt á greinar ... 20
Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2015-2019 ... 20
Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingina 2015-2019 ... 21
Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2015-2019 ... 22
Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2015-2019 ... 23
Rakstrarkarmar fyri § 6 Vinnumál 2015-2019 ... 24
Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2015-2019 ... 25
Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsumál 2015-2019 ... 27
Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2015-2019 ... 29
Játtanarkarmar fyri § 20 Inntøkur 2015-2019 ... 31
Løguætlan 2015-2019 ... 32
Fylgiskjal A: Konjunkturjavnað framleiðsla og konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran ... 34

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Løgtingið** **Argir**, 27. mars 2014

**Løgtingsmál nr. 146/2013: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015**

# Uppskot

# til

# samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 verður 4.535,6 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 4.239,7 mió. kr., og løgukarmurin verður 295,9 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.338,9 mió. kr. Í uppskotinum til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 er lagt upp fyri, at eldraøkið verður flutt til kommunurnar við ársbyrjan 2015 við upphædd svarandi til framskrivaðar útreiðslur, og sum ávirkar inntøkur og útreiðslur við hesi upphædd í 2015. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2015 býttir á greinar.

**Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015**

| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|
| § 1 Løgtingið | 47,4 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 59,6 | 2,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 344,6 | 74,6 |
| § 5 Fiskivinnumál | 171,2 | 0,0 |
| § 6 Vinnumál | 304,4 | 32,0 |
| § 7 Mentamál | 978,1 | 121,0 |
| § 11 Heilsumál | 936,1 | 35,0 |
| § 12 Almannamál | 1.398,3 | 31,3 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **4.239,7** | **295,9** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.535,6** | |
| § 20 Inntøkur | 4.338,9 | |
| **Inntøkukarmur** | **4.338,9** | |
| **RLÚ-úrslit** | **-196,7** | |

Løgtingið verður gjørt varugt við, at til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 er grundarlagið tær givnu fyritreytirnar fyri framskrivingarnar og tey neyðugu tiltøkini, soleiðis sum lýst í viðmerkingunum og hjáløgdu Búskaparfrágreiðing I.

**Viðmerkingar**

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, heruppií tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl. Hetta er fimtu ferð, at uppskot til løgtingssamtykt um játtanarkarmar verður lagt fram eftir játtanarskipanini, sum varð sett í gildi í 2009.

Uppskotið til játtanarkarmar er gjørt við støði í samgonguskjalinum, har ið samgongan hevur sett sær málið at fáa yvirskot á fíggjarlógina í seinasta lagi 2016. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 er í høvuðsheitum grundað á samtyktu játtanarkarmarnar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2014 og á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2014. Framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum av nýggjum, umframt at umraðfest er á summum økjum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum. Inntøkusíðan er tí fyri stóran part grundað á óvissar metingar um framtíðar búskapargongd. Útreiðslusíðan er í so máta lættari at meta um, tí størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum samtykt er, at almennu Føroyar skulu bjóða.

Á inntøkusíðuni verða framdar raðfestingar og tiltøk. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Við so óvissum fyritreytum er búskaparpolitiska avbjóðingin stór at stýra eftir einum máli at fáa hallið á fíggjarlógini burtur í 2016. Til ber at gera forsagnir, har ið roynt verður at meta um búskaparvøkstur í nærmastu framtíð, men eingin er førur fyri at spáa um búskaparvøksturin fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans fleiri ár frameftir lesast við fyrivarni.

Inntøkurnar í uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 eru framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar í løtuni. Sum grundarlag undir metingum fyri búskaparvøksturin komandi árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina seinastu árini og vitan um gongdina innan ymisk tjóðarbúskaparlig vísitøl og metingar av húsarhaldsnýtslu, íløgum og tílíkum. Eisini verða forsagnir hjá Búskaparráðnum brúktar sum partur av grundarlagnum fyri at meta um búskaparvøksturin.

Eisini skal viðmerkjast, at serlig viðurskifti, t.d. í ávísum vinnugreinum, eru tikin við í grundarlagið undir framrokningunum. Í fyritreytunum fyri 2015 verður vøksturin í bruttotjóðarúrtøku (BTÚ) mettur til umleið 3% (í ársins prísum). Hesar metingar samsvara væl við nýggjastu metingarnar, sum Búskaparráðið er komið við. Búskaparráðið metti í frágreiðingini frá mars 2014, at BTÚ sannlíkt veksur umleið 4% í 2014, treytað av, at avtala fæst millum strandarlondini um fiskiskapin eftir uppsjóvarfiski í 2014.

**Høvuðsfyritreytir í sambandi við uppskotið til játtanarkarmar**

Høvuðsfyritreytin fyri uppskotinum til játtanarkarmar 2015-2019 er ásetingin í samgonguskjalinum, at avlop skal vera á fíggjarlógini í seinasta lagi í 2016. Hetta var eisini høvuðsfyritreyt fyri játtanarkørmunum fyri 2014-2018, ið Løgtingið samtykti í mai 2013. Í tí uppskotinum minkaði hallið í landskassanum eftir trimum árum, soleiðis at avlop er aftur á fíggjarlógini í 2016.

Býtið millum greinarnar er broytt samsvarandi broyttum málsøkjabýti og øðrum broyttum fyritreytum, til dømis dagførdum inntøkumetingum. Harafturat eru politiskar raðfestingar á útreiðslu- og inntøkusíðuni hjá landskassanum og aðrar tillagingar.

**Fyritreytir fyri framrokning av útreiðslum 2015-2019**

Nominel lønarframskriving á 1,5% er givin í 2015, men í 2016-19 er roknað við føstum prísum. Lønarframskrivingin á 1,5% er roknað sum ¾ av 1,9%, við tað at almennu sáttmálalønirnar hækka 1,9% 1. oktober í ár, og eftir 1. oktober 2015 eru ongar hækkingar í sáttmálalønum avtalaðar. Prísvøkstur er ikki afturborin stovnum og virksemi, uttan har hetta serskilt er nevnt. Roynt hevur verið at framrokna útreiðslurnar 2016-2019 í føstum prísum.

Framrokningarnar eru sostatt í høvuðsheitum grundaðar á fólkatal og fólkasamanseting, til dømis metta talinum á skúlanæmingum og pensjónistum frá 2015 til 2019. Vøkstur í talinum á fólkapensjónistum er til dømis ein orsøk til, at framrokningar á grein 12 (Almannamál) eru stórar. Í framrokningunum er tikið hædd fyri bundnum raðfestingum næstu árini, til dømis at nýggj ellis- og røktarheim og stovnar verða tikin í nýtslu.

**Fyritreytir fyri framrokning av inntøkum 2015-2019**

Inntøkurnar í uppskotinum til játtanarkarmar fyri árini 2015-2019 eru framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar í løtuni. Eisini verður tøk vitan, hagtøl um búskapargongd og metingar um útlit fyri gongdina í búskapinum brúkt. Forsagnir frá millumtjóða stovnum og Búskaparráðnum hava verið brúktar sum partur av grundarlagnum undir metingunum um búskapargongdina sum heild. Harafturat er lagt upp fyri serligum umstøðum innan ávísar vinnugreinar, sum kunnu væntast at ávirka inntøkurnar hjá landskassanum.

Sum heild hevur verið roynt at framrokna inntøkurnar varisliga grundað á eina fyrivarnisreglu og ta yvirskipaðu óvissu, sum í løtuni er um gongdina í føroyska búskapinum og í heimsbúskapinum sum heild. Royndirnar síðstu árini eru, at tað er torført at meta frammanundan um inntøkurnar hjá landskassanum og tær broytingar í inntøkum, sum kunnu koma av ymiskum tiltøkum, skatta- og avgjaldsbroytingum og øðrum.

Í fyritreytunum fyri uppskotinum til játtanarkarmar fyri 2015-2019 verður BTÚ í ársins prísum mett at vaksa um 3% um árið í ársins prísum. Tó verður vøksturin mettur nakað hægri í 2014, um 4% samsvarandi metingum frá Búskaparráðnum. Á teimum skatta- og inntøkujáttanum, har hetta verður hildið vera neyðugt, eru gjørdar serstakar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanina, til dømis viðvíkjandi rentupostunum hjá landskassanum. Roynt hevur verið at framrokna inntøkurnar hjá landskassanum í føstum prísum frá 2016 og frameftir. Vanligi

lønarskatturin og flestu avgjaldsinntøkurnar eru framroknaðar við 1,5% í føstum prísum um árið frá 2016 og frameftir.

### Uppskotið til játtanarkarmar 2015-2019

Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á fíggjarlógini fyri 2015 er í høvuðsheitum gjørt við støði í teimum játtanarkørmum, sum Løgtingið samtykti í mai mánaði 2013, umframt á tær politisku semjur og avtalur, sum eru gjørdar síðani. Harafturat er uppskotið grundað á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2014, umframt at nýggjar framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum, og at málsøkjabýtið er broytt.

Broytingar eru í uppskotinum samanborið við játtanarkarmarnar fyri 2014, av tí at fyritreytir eru broyttar bæði fyri inntøkur og útreiðslur, umframt at umraðfest er á summum økjum. Í uppskotinum til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 er til dømis lagt upp fyri, at eldraøkið verður flutt til kommununnar við ársbyrjan 2015 við upphædd áljóðandi 372,1 mió. kr., og sum ávirkar inntøkur og útreiðslur við hesi upphædd í 2015.

Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2015 til 2019 útgreinað við tiltøkum.

**Talva 1: Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2015-2019**

| *Mió. kr.* | **Meting 2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur byrjan | 4.512,5 | 4.576,8 | 4.576,8 | 4.576,8 | 4.576,8 | 4.576,8 |
| Framskrivingar | 64,3 | 97,0 | 139,9 | 191,9 | 234,1 | 275,8 |
| Tiltøk, JK-2014 | - | -23,0 | -69,6 | -94,8 | -107,7 | -107,7 |
| Nýggj tiltøk | - | -29,0 | -53,0 | -77,0 | -77,0 | -77,0 |
| Felagstiltøk | - | -10,0 | -23,5 | -23,5 | -23,5 | -23,5 |
| Eldraøkið til kommununnar | - | -372,1 | -375,5 | -378,9 | -382,3 | -385,7 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.576,8** | **4.239,7** | **4.195,1** | **4.194,5** | **4.220,4** | **4.258,7** |
| | | | | | | |
| **Løguútreiðslur, §1-§12** | **299,0** | **295,9** | **252,4** | **285,9** | **282,9** | **288,9** |
| | | | | | | |
| **Rentuútreiðslur, netto, §20** | **80** | **77,0** | **74,0** | **66,0** | **78,0** | **77,0** |
| | | | | | | |
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.655,1 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 |
| Framskrivingar | 21,6 | -88,7 | -27,4 | 29,6 | 88,6 | 146,6 |
| Nýggj tiltøk | - | 200,0 | 252,5 | 252,5 | 252,5 | 252,5 |
| Eldraøkið til kommununnar | - | -372,1 | -375,5 | -378,9 | -382,3 | -385,7 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.676,7** | **4.415,9** | **4.526,3** | **4.579,9** | **4.635,5** | **4.690,1** |
| | | | | | | |
| **RLÚ-úrslit** | **-279,1** | **-196,7** | **4,8** | **33,5** | **54,2** | **65,5** |

### Nýggjar inntøkur

Samgongan er samd um bæði at hækka inntøkurnar og at lækka vøksturin í útreiðslunum hjá landskassanum næstu árini fyri stigvíst at fáa avlop á fíggjarlógini fyri 2016. Inntøkutiltøk verða framd fyri umleið 200 mió. kr. í 2015, og hetta skal økjast við 52 mió. kr. í 2016. Sostatt verða tiltøk fyri tilsamans 252 mió. kr. fram til 2016, eins og víst er í talvuni omanfyri.. Eftir galdandi lógum fella inntøkurnar frá tilfeingisskatti og avgjaldi á fiskatilfeingi burtur við

ársenda 2014. Sum nýggj tiltøk eru tikin við tilfeingisskattur og loyvisgjald á alivinnuna, sum verða í gildi frá 2015 og frameftir, umframt at arbeitt verður við øðrum inntøkutiltøkum. Tiltøkini fevna millum annað um loyvisgjald á alivinnu. Uppskot um hetta er lagt fyri Løgtingið. Fiskivinnunýskipan verður framd, sum eisini skal leggja gjøld á fiskivinnuna í fastar karmar.

Av øðrum tiltøkum kann nevnastm at ætlanin er at dagføra reglur fyri samansetingina av virðisbrøvum í umsitingini av gjaldførinum hjá landinum, soleiðis at rentuinntøkurnar vaksa.

**Útreiðslur landskassans í 2015 og frameftir**

Tiltøkini at minka útreiðsluvøksturin hjá landskassanum fevna um sparingar á rakstrinum, millum annað felagstiltøk fyri aðalráðini. Tiltøk verða sett í verk, sum eftir ætlan fara at tálma vøkstrinum í útreiðslum við 146 mió. kr. fram móti 2016. Harafturat verður løgukarmurin hjá landskassanum minkaður 30 mió. kr. í 2016.

Talvan niðanfyri vísir uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar býtt á greinar og ár.

**Talva 2: Uppskot til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógunum fyri 2015-2019**

| *Mió. kr.* | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | |
| §1 Løgtingið | 47,4 | 48,6 | 49,2 | 50,0 | 51,0 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 59,6 | 49,9 | 48,2 | 48,3 | 48,7 |
| §3 Fíggjarmál | 344,6 | 332,0 | 333,2 | 337,3 | 341,3 |
| §5 Fiskivinnumál | 171,2 | 165,2 | 172,9 | 172,8 | 172,8 |
| §6 Vinnumál | 304,4 | 302,3 | 300,5 | 301,8 | 303,1 |
| §7 Mentamál | 978,1 | 972,2 | 962,9 | 965,3 | 970,0 |
| §11 Heilsumál | 936,1 | 929,1 | 925,5 | 931,1 | 940,2 |
| §12 Almannamál | 1.398,3 | 1.395,8 | 1.402,1 | 1.413,8 | 1.431,6 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.239,7** | **4.195,1** | **4.194,5** | **4.220,4** | **4.258,7** |
| **Løguútreiðslur, §1-§12** | **295,9** | **252,4** | **285,9** | **282,9** | **288,9** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.535,6** | **4.447,5** | **4.480,4** | **4.503,3** | **4.547,6** |
| **§20 Inntøkur** | **4.338,9** | **4.452,3** | **4.513,9** | **4.557,5** | **4.613,1** |
| **RLÚ-úrslit** | **-196,7** | **4,8** | **33,5** | **54,2** | **65,5** |

**Skjal hjálagt:**
Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I

Fíggjarmálaráðið, 27. mars 2014

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

# Inngangur

Sambært §8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl. Hetta er fimtu ferð, at uppskot til løgtingssamtykt um játtanarkarmar verður lagt fram eftir játtanarskipanini, sum varð sett í gildi í 2009.

Uppskotið til játtanarkarmar er gjørt við støði í samgonguskjalinum, har ið samgongan hevur sett sær málið at fáa yvirskot á fíggjarlógina í seinasta lagi 2016. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 er í høvuðsheitum grundað á samtyktu játtanarkarmarnar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2014 (løgtingsmál nr. 146/2012) og á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2014 (løgtingsmál nr. 25/2013). Framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum av nýggjum, umframt at umraðfest er á summum økjum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðan er ein lýsing av uppskotinum til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015. Fyritreytirnar fyri játtanarkørmunum verða eisini lýstar, umframt at framrokningar og ætlað tiltøk árini 2015 til 2019 verða lýst. Langtíðarløguætlanin verður eisini lýst.

## Lýsing av búskaparstøðu og verandi gongd

Flestu vísitølini benda á, at framgongdin í búskapinum, sum byrjaði í 2011, heldur fram. Framgongdin síðstu umleið trý árini er í stóran mun komin av góðari gongd í ávísum útflutningsvinnum. Góða gongdin í útflutningsvinnunum kemur serliga av góðari prísgongd og vaksandi nøgdum innan ali- og uppsjóvarvinnuna.

Tekin eru um, at eftirspurningurin frá húsarhaldum og fyritøkum í Føroyum eftir vørum og tænastum er vaksandi. Hetta sæst m.a. aftur í hagtølum yvir innflutning. Harafturat verða fleiri privatar íløgur gjørdar sammett við árini frammanundan, umframt at íløguvirksemið hjá tí almenna verður stórt bæði í 2014 og í 2015. Eisini verða tvær oljuboringar í 2014, sum kunnu væntast at stimbra búskapin nakað og geva nakað av skattainntøkum til landskassan. Roknast kann tí við, at samfelagsbúskapurin verður stimbraður av privatum og almennum íløgum í 2014 og 2015.

Grundað á vaksandi eftirspurning frá húsarhaldum og at ávíst íkast til vøkstur kann væntast frá privatum íløgum, metir Fíggjarmálaráðið, at føroyski búskapurin, BTÚ, veksur 3-4% í ársins prísum í 2014 og umleið 3% í 2015 (stutt frágreiðing er um hugtakið *bruttotjóðarúrtøku* aftast í fylgiskjalinum um konjunkturjavnað úrslit fyri tað almenna). Metingarnar um vøkstur samsvara væl við metingarnar hjá Búskaparráðnum fyri næstu árini. Sambært nýggjastu uppgerð frá Hagstovu Føroya vaks BTÚ 3% í 2012.

Fíggjarmálaráðið væntar, at vøksturin verður áleið á hesum støði næstu árini og møguliga nakað hægri í 2014, sum kemur av nógvum privatum og almennum íløgum í 2014 og at útflutningsvirðið innan uppsjóvarvinnuna sannlíkt veksur í 2014 av tí, at avtala er fingin í lag við ES og Noreg um fiskiskapin eftir makreli. Tað er framvegis ikki greitt, hvussu verður við avtalunum um annan uppsjóvarfisk og um handilstiltøkini móti Føroyum verða strikað.

**Mynd 1**

**Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2014**




Viðm.: Tølini fyri 2013 og 2014 eru metingar frá Fíggjarmálaráðnum.
Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Inntøkumetingar í uppskotinum til játtanarkarmar á fíggjarlógini fyri 2015 byggja tí í flestu førum á, at vøksturin verður umleið 3% (tó 3-4% í 2014). Í játtanarkørmunum fyri 2014 varð eisini roknað við árligum vøkstri í BTÚ á 3%. Mynd 1 vísir gongdina í BTÚ síðstu árini og væntaðu gongdina fyri 2013 og 2014.

Gongdin er framvegis vánalig í heimligu fiskivinnuni, og henda vinnan fer væntandi at geva lítið ella eitt avmarkað ískoyti til búskaparvøksturin næstu árini. Ískoytið til vøksturin frá atknýttu fiskavirkisvinnuni á landi verður væntandi eisini avmarkað næstu árini. Framleiðslan fer væntandi

at vaksa nakað á teimum virkjunum, sum virka uppsjóvarfisk á landi, og hetta fer væntandi at geva eitt ískoyti til vøksturin í BTÚ.

Brúkaraprísir eru lækkaðir síðsta hálvárið 2012 og alt 2013. Lækkingin kemur í størstan mun av herdari kapping millum føroysku peningastovnarnir, sum hevur havt lægri útlánsrentur við sær. Harafturat hava oljuprísir verið støðugir, og harvið hava flutningskostnaðir og kostnaðurin á vanligum nýtsluvørum, til dømis matvørum, verið mestsum støðugir í 2012 og 2013. Gongdin í prístalinum er víst í mynd 2.

Mynd 2

Brúkaraprístalið, 2001 til 2013, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Óvissur eru sjálvsagt um búskapargongdina, sum eiga at verða nevndar. Ein óvissa er til dømis um fiskiskapin eftir uppsjóvarfiski næstu árini og um tær avtalur, sum Føroyar hava við hini strandalondini um kvotur og atgongd til havøki, umframt at ES hevur sett handilstiltøk í verk móti Føroyum. Avtalurnar millum strandarlondini um fiskiskapin eftir makreli og svartkjafti fer at hava við sær, at avreiðingarprísir í miðal verða hægri sammett við um eingin avtala var.

Ein onnur óvissa er um gongdina í heimsbúskapinum sum heild, sum framvegis tykist vera viðbrekin. Í síðstuni eru til dømis fleiri ábendingar komnar um, at gongdin í kinverska búskapinum og í menningarlondum er meira viðbrekin, enn áður mett, og í stóran mun treytað av lagaligum fíggjarumstøðum, lágum rentustøði og ríkiligum gjaldføri kring allan heimin. Óvist er eisini, hvørjar avleiðingarnar vera á heimsbúskapin, tá ið miðbankar í vesturheiminum líðandi fara at minka tey óvanligu stuðulstiltøk, sum er sett í verk fyri at stimbra búskapin og fíggjarmarknaðir.

*Framgongd sæst framvegis í týðandi vísitølum*

Hóast føroysku húsarhaldini framvegis tykjast vera varin, eru tekin um, at privata nýtslan er vaksandi. Innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum vørum er vaksandi (mynd 3), sum er tekin um vaksandi eftirspurning í samfelagnum. Sambært seinasta treystitalinum, eru húsarhaldini vorðin bjartskygdari sammett við fyri hálvum ári síðani.

Mynd 3

Innflutningur, ódrúgvar og drúgvar og hálvdrúgvar nýtsluvørur og útgoldin løn, januar 1998 til januar 2014




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Framgongd sæst framvegis í týðandi vísitølum fyri føroyska búskapin. Arbeiðsloysið er lækkandi og varð skrásett til 4,1% í januar mánaði. Talið á løntakarum er vaksið síðani miðskeiðis í 2011, tó at vøksturin er hæsaður av higartil í ár. Mynd 4 vísir gongdina í arbeiðsloysinum og í talinum á løntakarum síðani ársbyrjan 2008.

Mynd 4

Árstíðarjavnaðir løntakarar í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til jan-2014




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Fólkaflytingin, netto, av landinum er framvegis minkandi. Frá januar 2013 til januar 2014 var nettoflytingin av landinum umleið 100 fólk. Í 2012 fluttu netto umleið 300 fólk av landinum, og í 2011 vóru tey umleið 400 í tali.

Mynd 5

Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til des-2013




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Enn sum áður hevur tað stóran týdning fyri langtíðarhaldførið í føroyska búskapinum at fáa vent hesi gongd, soleiðis at færri fólk í arbeiðsførum aldri fara av landinum. Á mynd 5 sæst til- og fráflyting úr Føroyum býtt á mánaðir síðani 2007, meðan mynd 6 vísir broytingar í fólkatalinum síðani 1970 býtt á ár.

Talva 1 vísir gongdina síðsta árið í fólkatalinum býtt á øki í landinum. Á talvuni sæst, at fólkatalið veksur í høvuðsstaðarøkinum og minkar ella stendur at kalla í stað aðrastaðni í landinum. Ávísar bygdir eru sjálvsagt uttanfyri høvuðsstaðarøkið, har ið fólkatalið vekur, men høvuðsgongdin er, at fólkatalið mestsum bara veksur í høvuðsstaðnum. Sama gongd, at fólkatalið veksur í miðstaðarøkjum og minkar í útjaðaraøkjum sæst eisini aðrastaðni í Vesturheiminum og í vaksandi mun. Nógv bendir eisini á, at gongdin fer at halda fram næstu árini og at tað verða torførari hjá útjaðaraøkjum at standa seg í kappingini móti miðstaðarøkjum.

Talva 1. Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. jan. 2012 til 31. des. 2013

| *Øki í landinum* | Fólkatal 1. jan. 2013 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 31. des. 2013 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 5.842 | 39 | -24 | 5.857 | 15 | 0,3 |
| Eysturoy | 10.661 | 42 | -116 | 10.587 | -74 | -0,7 |
| Tórshavnar økið* | 17.961 | 118 | 115 | 18.194 | 233 | 1,3 |
| Streymoyggin annars | 4.640 | 34 | -52 | 4.622 | -18 | -0,4 |
| Vágoy | 3.055 | 18 | -10 | 3.063 | 8 | 0,3 |
| Sandoy | 1.307 | -7 | -16 | 1.284 | -23 | -1,8 |
| Suðuroy | 4.694 | 21 | -14 | 4.701 | 7 | 0,1 |
| **Alt landið** | **48.160** | **265** | **-117** | **48.308** | **148** | **0,3** |

*Tórshavn, Hoyvík og Argir.

*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 6**

**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2013**




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Gongdin í lønargjaldingum býtt á vinnugreinar (talva 2 og mynd 7) vísir, at vøkstur er í lønargjaldingum í øllum høvuðsvinnugreinum, tó at vøksturin er lítil innan fiski- og alivinnu og í byggivinnunum tilsamans. Vøkstur sæst nú eisini í lønargjaldingum í privatu tænastuvinnunum. Lønirnar vaksa eisini innan almennu tænastuvinnurnar, men her eigur at verða nevnt, at verkfall var á almenna arbeiðsmarknaðinum í 2012, sum ávirkar sammetingina við 2013. Mynd 7 vísir gongdina í lønargjaldingum síðstu árini, býtt á høvuðsvinnugreinar.

**Talva 2. Lønir í høvuðsvinnugreinum, 2010-2013, mió. kr.**

| *Vinnugrein* | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Munur 2012-13 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.250 | 1.286 | 1.357 | 1.361 | 4 | 0,3 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 821 | 827 | 839 | 840 | 1 | 0,1 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.244 | 2.216 | 2.328 | 2.373 | 45 | 2,0 |
| Almenn o.o. tænasta | 2.486 | 2.524 | 2.561 | 2.620 | 59 | 2,3 |
| Lønargjaldingar tilsamans | 6.801 | 6.852 | 7.084 | 7.193 | 110 | 1,6 |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 7**

**Lønargjaldingar í mió. kr. býtt á høvuðsvinnugreinar og ársfjórðingar, BTÚ í mió. kr., 2004 til 2013**




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Nýggjasta uppgerðin av konjunkturvísitalinum (treystitalinum) hjá Fíggjarmálaráðnum vísir, at føroysk húsarhald eru meira bjartskygd um framtíðina (mynd 8). Kanningin varð gjørd í januar mánaði í ár. Serliga húsarhaldini og byggivinnan tykjast bjartskygdari sammett við fyri hálvum ári síðani. Hinvegin minkar vísitalið fyri handils-, tænastu-, og tilfeingisvinurnar. Samlaða vísitalið er tó lækkað úr 32 til 23.

**Mynd 8**

**Konjunkturvísital fyri brúkarar og vinnu tilsamans**




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Byggivinnan er bjartskygdari enn fyri hálvum ári síðani. Fleiri stórar og arbeiðskrevjandi byggiverkætlanir eru í umbúnaði, og trot á arbeiðsmegi kann gerast ein fløskuhálsur fyri byggivinnuna. Vísitalið gevur eina ábending um, hvussu vinna og brúkarar meta um støðuna beint nú, seinastu tólv mánaðirnar og vánirnar fyri næstu tólv mánaðirnar.

*Viðurskifti við útlond*

Í 2010 og í 2011 var avlopið á gjaldsjavnanum góðar 800 mió. kr. bæði árini, meðan hall á umleið 450 mió. kr. var í  2012. Í 2013 væntast aftur stórt avlop á gjaldsjavnanum. Avlopið kemur bæði av, at útflutningurin er vaksin nógv í 2013 og av at innflutningurin minkaði í 2013. Í 2012 var metnógv innflutt, sum millum annað kom av innflutningi av flogførum, skipum og øðrum tilfari til íløgur, sum vórðu gjørdar tað árið.

**Mynd 9**

**Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2013**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur.
Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Ein vaksandi partur av inntøkunum á gjaldsjavnanum stavar frá lønarinntøkum úr útlondum. Í 2005 vunnu føroyingar í arbeiði uttanlands tilsamans umleið 480 mió. kr., meðan teir í 2012 vunnu umleið 1 mia. kr.

Mynd 10

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2012




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Føroyski gjaldsjavnin er vístur í mynd 10. Sæð burtur frá 2012, hevur avlop fyri tað mesta verið á gjaldsjavnanum. Á handilsjavnanum hava hinvegin verið hall síðstu mongu árini, sæð burturfrá 2011 og 2010 (mynd 9). Føroyski handilsjavnin sveiggjar nógv alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, olju- og fiskaprísum og prísunum á alifiski.

Orsakað av, at so stórar lønarinntøkur og rakstrarflytingar eru til landið uttaneftir, er ikki óvæntað, at stórt hall er á handilsjavnanum samstundis sum avlop er á gjaldsjavnanum. Í góðum tíðum tá ið privata nýtslan er høg og vinnulívið ger nógvar íløgur, sæst vanliga, at hall er á handilsjavnanum og at avlopið á gjaldsjavnanum minkar. Meginparturin av øllum nýtslu- og íløguvørum í Føroyum verður innfluttur, meðan vit útflyta meginpartin av teimum vørum, sum verða framleiddar í Føroyum.

## Altjóða bakstøði

Gongdin í heimsbúskapinum og í teimum londum, sum vit útflyta vørur til, hevur stóran týdning fyri gongdina í føroyska búskapinum sum heild. Ávirkanin kann bæði vera beinleiðis, til dømis umvegis sølu prísir á útflutningsvørum og møguleikarnir at selja vørur á ymiskum marknaðum. Ávirkanin kann eisini vera óbeinleiðis, til dømis umvegis prísin á olju og á øðrum innfluttum vørum, atgongdina til fígging og møguleikarnar hjá peningastovnum at veita lán í Føroyum og hugin hjá húsarhaldum at brúka pening til nýtslu.

Framgongd er framvegis í heimsbúskapinum, og framgongdin tók dik á seg annað hálvár 2013. Í framkomnu londunum hevur framgongdin verið størri enn væntað síðsta hálvárið. Í Evropa hevur verið hóvlig framgongd í búskapinum í tríggjar ársfjórðingar. Í USA og Stórabretlandi er framgongdin nakað størri enn í Evropa (sí talvu 3).

Búskaparframgongdin í Vesturheiminum kemur í stóran mun av, at privatar íløgur og nýtsla vaksa heldur meira enn áður væntað. Vøksturin í íløgum og nýtslu verður millum annað stimbraður av, at lánveitingar í fíggjarstovnum nú eru heldur lagaligari sammett við áður. Eftirspurningurin í framkomnu londunum hevur sum heild verið heldur størri enn áður mett, meðan eftirspurningurin

hevur verið minni í menningarlondum. Samanumtikið hevur framgongdin í heimsbúskapinum síðsta árið verið heldur størri enn áður væntað.

**Talva 3. Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2011-2015 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum* | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 1,8 | 2,8 | 1,9 | 2,8 | 3,0 |
| Evruøkið | 1,5 | -0,7 | -0,4 | 1,0 | 1,4 |
| Stóra Bretland | 1,1 | 0,3 | 1,7 | 2,4 | 2,2 |
| Ídnaðarlond | 1,7 | 3,1 | 3,0 | 3,7 | 3,9 |
| Menningarlond | 6,2 | 4,9 | 4,7 | 5,1 | 5,4 |
| Heimsbúskapurin | 3,9 | 3,1 | 3,0 | 3,7 | 3,9 |

*Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 21. januar 2014.Tølini fyri 2014 og 2015 eru metingar.*

Vøksturin í menningarlondum er í løtuni um 5% um árið, í USA um 2-3% um árið, og í Evropa er vøkstur á umleið 1% um árið. Í Evropa er framvegis stórur munur á vøkstrinum í Norðurevropa og í Suðurevropa. Búskaparvøksturin er heldur ikki somikið nógvur, at høga arbeiðsloysið í Suðurevropa lækkar stórvegis. Í talvu 3 síggjast metingar hjá IMF um vøkstur í BTÚ í føstum prísum næstu árini í ymiskum londum og økjum. Talva 4 vísir nominellan vøkstur í BTÚ (ársins prísir), býtt á lond.

**Talva 4. Árligur vøkstur í BTÚ í ársins prísum, býtt á lond**

| *nominellur vøkstur* | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 12,9 | 5,9 | -0,8 | -1,7 | 7,0 | 2,4 | 3,0 | *3,0* | *4,0* |
| Danmark | 5,6 | 3,9 | 3,4 | -5,0 | 5,7 | 1,8 | 1,9 | 1,9 | 2,7 |
| Ísland | 13,9 | 12,0 | 13,1 | 1,2 | 2,5 | 6,0 | 4,3 | 5,2 | 7,7 |
| Noreg | 11,3 | 5,8 | 11,0 | -6,9 | 6,8 | 8,1 | 5,7 | 3,2 | 5,4 |
| Stóra Bretland | 5,7 | 5,8 | 2,4 | -3,1 | 4,8 | 3,5 | 1,8 | 3,5 | 4,0 |
| USA | 5,8 | 4,5 | 1,7 | -2,1 | 3,7 | 3,8 | 4,6 | 3,2 | 4,7 |
| Evruøkið | 5,2 | 5,4 | 2,2 | -3,5 | 2,7 | 2,8 | 0,7 | 1,1 | 2,0 |
| OECD-lond | 5,7 | 5,2 | 2,6 | -2,5 | 4,4 | 3,8 | 3,1 | 2,7 | 4,0 |

*Kelda: Hagstova Føroya og IMF. Tølini fyri 2013 og 2014 eru metingar.*

**Talva 5. Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, býtt á lond**

| *Arbeiðsloysi í %* | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 2,7 | 1,5 | 1,3 | 3,9 | 5,8 | 7,0 | 5,5 | 4,4 | N/A |
| Danmark | 3,9 | 3,8 | 3,5 | 6,1 | 7,5 | 7,6 | 7,5 | 7,1 | 7,1 |
| Ísland | 1,3 | 1,0 | 1,6 | 8,0 | 8,1 | 7,4 | 5,8 | 5,1 | 4,6 |
| Noreg | 3,4 | 2,5 | 2,6 | 3,2 | 3,6 | 3,3 | 3,2 | 3,3 | 3,3 |
| Stóra Bretland | 5,4 | 5,4 | 5,6 | 7,5 | 7,9 | 8,0 | 8,0 | 7,7 | 7,5 |
| USA | 4,6 | 4,6 | 5,8 | 9,3 | 9,6 | 8,9 | 8,1 | 7,6 | 7,4 |
| Evruøkið | 8,5 | 7,6 | 7,6 | 9,6 | 10,1 | 10,2 | 11,4 | 12,3 | 12,2 |

*Kelda: Hagstova Føroya og IMF. Tølini fyri 2014 eru metingar.*

Í talvu 5 er arbeiðsloysi víst býtt á útvald lond. Arbeiðsloysið er framvegis sera høgt í Suðurevropa. Flestu búskaparfrøðingar eru samdir um, at av tí at arbeiðsloysið hevur sera høgt í fleiri ár serliga í Suðurevropa, kann roknast við liggjandi høgum arbeiðsloysi og at arbeiðsmarknaðurin verður

ávirkaður av hesum fleiri áratíggju frameftir. Í USA lækkar arbeiðsloysið og er nú umleið 6,5%. Í Evropa er arbeiðsloysið mestsum støðugt umleið 12%. Í Suðurevropa er arbeiðsloysið væl hægri, heilt upp til umleið 25% í Spania og Grikkalandi. Í Spania, Írlandi og Portugal er arbeiðsloysið í løtuni minkandi, meðan tað framvegis veksur í Italia og Hálandi og er mestsum støðugt aðrastaðni.

Heimsbúskapurin er framvegis stimbraður av søguliga lágum rentum, lagaligum fíggjarumstøðum og stuðulstiltøkum frá miðbankum. Harafturat fer fíggjarpolitikkurin í flestu londum í vesturheiminum í 2014 væntandi at virka heldur minni tálmandi sammett við 2013 og árini frammanundan. Í løtuni er líkt til, at rentustøðið verður verandi óvanliga lágt, í øllum førum næstu 1-2 árini.

Enn er ikki greitt, hvørja ávirkan tað fær á heimsbúskapin og á altjóða fíggjarmarknaðir sum heild, tá ið miðbankar stigvíst fara at minka um tey nógvu og óvanligu stuðulstiltøkini, sum eru sett í verk síðstu árini. Stuðulstiltøkini hava einki søguligt fordømi, og tað er framvegis ógreitt, á hvønn hátt og eftir hvørji tíðarætlan stuðulstiltøkini verða minkað og í hvønn mun altjóða fíggjarmarknaðir verða ávirkaðir av hesum, harundir av at rentustøðið hækkar aftur.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna tilsamans síðstu árini. Mynd 11 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og í RLÚ-úrsliti síðani 1997 við mettum tølum fyri 2013 og játtanartølum fyri 2014.

Mynd 11

Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2014




Viðm.: Tølini fram til 2012 eru roknskapartøl.
* Tølini fyri 2013 eru fyribils mett tøl, og tølini fyri 2014 eru játtanartøl.
** Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan og Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Á myndini sæst, at at útreiðslurnar hjá landskassanum eru vaksnar meira enn inntøkurnar síðani 2007, og landskassin hevur havt hall øll árini síðani 2007. Myndin vísir eisini, at serliga inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini í samfelagnum.

**Mynd 12**

**Landskassans bruttoskuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2013**




Kelda: Gjaldstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 12 vísir gongdina í bruttoskuld og innistandandi hjá landinum. Gongdin síðstu árini, har ið inntøkurnar hjá landskassanum frá skattum og avgjøldum ikki eru vaksnar í sama mun sum útreiðslurnar, hevur givið eina verri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum, sum sæst aftur sum vaksandi bruttoskuld.

Á mynd 12 sæst, at bruttoskuldin hjá landskassanum í mió. kr. er vaksin síðani 2007. Enn hevur landið ikki nógva skuld sammett við flest onnur lond í Vesturheiminum (talva 6), men givið er, at inntøkur og útreiðslur hjá landinum mugu javnviga sæð yvir longri áramál, tá ið atlit eisini eru tikin at ávirkanini frá konjunkturunum. Gera tær ikki tað, er rikni fíggjarpolitikkurin ikki haldførur yvir longri áramál, við tað at skuldin tá vil halda áfram at vaksa. Mynd 13 vísir inntøkur, útreiðslur og úrslit fyri almenna geiran tilsamans árini 1998 til 2012.

**Mynd 13**

**Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), mió. kr., 1998 til 2012**




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Búskaparráðið fer væntandi seinni í ár at kunngera greining av langtíðarhaldførinum í føroyska búskapinum. Tá fæst væntandi betri greiða á, hvussu haldførið er í føroyska búskapinum, og um neyðugt er við stórum átøkum fyri at tryggja haldførið og yvir hvat áramál. Fyribils og ávegis meting hjá Fíggjarmálaráðnum er, at bygnaðarliga hallið hjá tí almenna í Føroyum tilsamans (land, kommunur og sosialir grunnar) er um 100 til 150 mió. kr. (sí frágreiðing um uppgerð av konjunkturjavnaðum halli í fylgiskjali). Í tann mun metingarnar um bygnaðarliga hallið eru

eftirfarandi, verður neyðugt at bøta um fíggjarjavnan millum almennar inntøkur og útreiðslur við hesi upphædd næstu árini.

**Talva 6. Úrslit fyri tað almenna tilsamans og almenn nettoskuld í % av BTÚ, býtt á lond**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Úrslit hjá tí almenna, % av BTÚ* | | | | | | | | | |
| Føroyar | 2,0 | 2,1 | -2,8 | -4,8 | -3,5 | -2,1 | -1,8 | N/A | N/A |
| Danmark | 5,0 | 4,8 | 3,3 | -2,8 | -2,7 | -2,0 | -4,2 | -1,7 | -2,0 |
| Ísland | 6,3 | 5,4 | -0,5 | -8,6 | -6,4 | -5,0 | -3,8 | -2,7 | -1,8 |
| Stóra Bretland | -2,8 | -2,8 | -5,0 | -11,3 | -10,0 | -7,8 | -7,9 | -6,1 | -5,8 |
| USA | -2,0 | -2,7 | -6,5 | -12,9 | -10,8 | -9,7 | -8,3 | -5,8 | -4,6 |
| Evruøkið | -1,3 | -1,1 | -3,5 | -8,9 | -7,7 | -6,5 | -5,9 | -4,5 | -3,6 |
| | | | | | | | | | |
| *Almenn nettoskuld, % av BTÚ* | | | | | | | | | |
| Føroyar | 3,5 | -3,4 | -2,2 | 1,4 | 5,6 | 16,1 | 11,4 | N/A | N/A |
| Danmark | 1,9 | -3,8 | -6,1 | -4,5 | -1,6 | 3,3 | 3,3 | 5,0 | 6,8 |
| Ísland | 7,8 | 10,8 | 41,8 | 55,7 | 59,9 | 66,7 | 68,2 | 64,1 | 63,6 |
| Stóra Bretland | 38,0 | 38,4 | 48,0 | 62,4 | 72,2 | 76,8 | 81,6 | 84,8 | 88,0 |
| USA | 46,7 | 46,5 | 52,4 | 64,6 | 72,8 | 79,9 | 84,1 | 87,4 | 88,3 |
| Evruøkið | 54,3 | 52,1 | 54,1 | 62,4 | 65,6 | 68,2 | 72,2 | 74,9 | 75,6 |

*Kelda: Hagstova Føroya og IMF. Tølini fyri 2014 eru metingar.*

Fyri haldførið á fíggjarpolitikkinum hevur tað týdning, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum. Hetta merkir, at nettoskuld í % av BTÚ ikki er støðugt vaksandi, tá ið atlit eisini eru tikin at konjunkturstøðuni. Talva 6 vísir úrslit fyri tað almenna tilsamans og almenna nettoskuld í % av BTÚ býtt á lond og ár. Talvan vísir, at almenna skuldin í Føroyum er ikki høg sammett fleiri onnur lond í Vesturheiminum. Fyri smærri samfeløg, sum ikki hava egið gjaldoyra og sum mugu upptaka lán uttanlands fyri at fíggja hall í almenna geiranum, er ein ávísur váði knýttur at tí at endurfíggja almenna skuld á lánsbrævamarknaðinum á hvørjum ári. Hetta er sjálvsagt serliga galdandi, um ríkni búskapar- og fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur.

## Uppskotið til játtanarkarmar

Talvurnar niðanfyri vísa uppskotið til játtanarkarmar. Fyrra talvan vísir játtnarkarmarnar yvir ár við framskrivingum, tiltøkum og tillagingum. Seinna talvan vísir játtanarkarmarnar yvir ár, býttar á greinar.

**Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2015-2019**

| *Mió. kr.* | Meting 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur byrjan | 4.512,5 | 4.576,8 | 4.576,8 | 4.576,8 | 4.576,8 | 4.576,8 |
| Framskrivingar | 64,3 | 97,0 | 139,9 | 191,9 | 234,1 | 275,8 |
| Tiltøk, JK-2014 | - | -23,0 | -69,6 | -94,8 | -107,7 | -107,7 |
| Nýggj tiltøk | - | -29,0 | -53,0 | -77,0 | -77,0 | -77,0 |
| Felagstiltøk | - | -10,0 | -23,5 | -23,5 | -23,5 | -23,5 |
| Eldraøkið til kommunurnar | - | -372,1 | -375,5 | -378,9 | -382,3 | -385,7 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.576,8** | **4.239,7** | **4.195,1** | **4.194,5** | **4.220,4** | **4.258,7** |
| **Løguútreiðslur, §1-§12** | **299,0** | **295,9** | **252,4** | **285,9** | **282,9** | **288,9** |
| **Rentuútreiðslur, netto, §20** | **80** | **77,0** | **74,0** | **66,0** | **78,0** | **77,0** |
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.655,1 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 |
| Framskrivingar | 21,6 | -88,7 | -27,4 | 29,6 | 88,6 | 146,6 |
| Nýggj tiltøk | - | 200,0 | 252,5 | 252,5 | 252,5 | 252,5 |
| Eldraøkið til kommunurnar | - | -372,1 | -375,5 | -378,9 | -382,3 | -385,7 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.676,7** | **4.415,9** | **4.526,3** | **4.579,9** | **4.635,5** | **4.690,1** |
| **RLÚ-úrslit** | **-279,1** | **-196,7** | **4,8** | **33,5** | **54,2** | **65,5** |

**Uppskot til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógunum fyri 2015-2019**

| *Mió. kr.* | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | |
| §1 Løgtingið | 47,4 | 48,6 | 49,2 | 50,0 | 51,0 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 59,6 | 49,9 | 48,2 | 48,3 | 48,7 |
| §3 Fíggjarmál | 344,6 | 332,0 | 333,2 | 337,3 | 341,3 |
| §5 Fiskivinnumál | 171,2 | 165,2 | 172,9 | 172,8 | 172,8 |
| §6 Vinnumál | 304,4 | 302,3 | 300,5 | 301,8 | 303,1 |
| §7 Mentamál | 978,1 | 972,2 | 962,9 | 965,3 | 970,0 |
| §11 Heilsumál | 936,1 | 929,1 | 925,5 | 931,1 | 940,2 |
| §12 Almannamál | 1.398,3 | 1.395,8 | 1.402,1 | 1.413,8 | 1.431,6 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.239,7** | **4.195,1** | **4.194,5** | **4.220,4** | **4.258,7** |
| **Løguútreiðslur, §1-§12** | **295,9** | **252,4** | **285,9** | **282,9** | **288,9** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.535,6** | **4.447,5** | **4.480,4** | **4.503,3** | **4.547,6** |
| **§20 Inntøkur** | **4.338,9** | **4.452,3** | **4.513,9** | **4.557,5** | **4.613,1** |
| **RLÚ-úrslit** | **-196,7** | **4,8** | **33,5** | **54,2** | **65,5** |

## Uppskotið til játtanarkarmar býtt á greinar

Niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2015-2019 víst býtt á greinar. Tølini fevna um øll játtanarsløg undantikið løgujáttanir, t.e. rakstrarjáttanir, stuðulsjáttanir og lógarbundnar játtanir. Løguætlanin er lýst serskilt.

### Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2015-2019

**Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2015-2019**

| **§ 1 Løgtingið, *mió. kr.*** | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 44,8 | 45,5 | 46,1 | 46,7 | 47,5 | 47,5 |
| Framskrivingar | 0,9 | 1,4 | 2 | 2 | 2 | 3 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **45,7** | **46,9** | **48,1** | **48,7** | **49,5** | **50,5** |
| Lønarframskriving | | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **45,7** | **47,4** | **48,6** | **49,2** | **50,0** | **51,0** |
| Tillagingar, JK15 | | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **45,7** | **47,4** | **48,6** | **49,2** | **50,0** | **51,0** |

### Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving
- Tænastumannaeftirlønir

**Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingina 2015-2019**

**Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingina 2015-2019**

| **§ 2 Løgmansfyrisitingin** *mió. kr.* | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 54,7 | 49,7 | 43,2 | 42,8 | 42,8 | 42,8 |
| Framskrivingar | 10,2 | 10,2 | 7,8 | 7,3 | 7,4 | 7,8 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **64,9** | **59,9** | **51,0** | **50,1** | **50,2** | **50,6** |
| *Harav felagstiltøk frá JK14* | | *5,0* | *10,0* | *10,0* | *10,0* | *10,0* |
| Lønarframskriving | | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **64,9** | **60,4** | **51,5** | **50,6** | **50,7** | **51,1** |
| Tillagingar, JK15 | | -0,8 | -1,6 | -2,4 | -2,4 | -2,4 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **64,9** | **59,6** | **49,9** | **48,2** | **48,3** | **48,7** |

**Framskrivingar**
Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving
- Sparitiltøk (0,8 mió. kr.)
- Ætlandi verður fult virksemi í sendistovuni í Moskva (uml. 1,2 mió. kr.)

**Rakstrarsparingar**
Sparingarnar verða framdar við tillagingum í starvsfólkahópinum, virkseminum og í stuðulspartinum.

**Nýskipan**
Felagstiltak at savna landsfyrisitingina (5 mió. kr. í 2015)

**Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2015-2019**

| **Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2015-2019** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 3 Fíggjarmál** *mió. kr.* | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 355,6 | 348,2 | 332,0 | 332,5 | 333,1 | 333,1 |
| Framskrivingar | -10,5 | -3,0 | 3,4 | 6,9 | 10,4 | 14,4 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **345,1** | **345,2** | **335,4** | **339,4** | **343,5** | **347,5** |
| *Harav felagstiltøk frá JK14* | *0* | *5* | *13,5* | *13,5* | *13,5* | *13,5* |
| *Tunnilsfelag flutt til løgu* | *15* | *5* | *25* | *35* | *35* | *35* |
| Lønarframskriving | | 2,2 | 2,2 | 2,2 | 2,2 | 2,2 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **345,1** | **347,4** | **337,6** | **341,6** | **345,7** | **349,7** |
| Tillagingar, JK15 | | -2,8 | -5,6 | -8,4 | -8,4 | -8,4 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **345,1** | **344,6** | **332,0** | **333,2** | **337,3** | **341,3** |

**Framskrivingar**
Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving
- Tænastumannaeftirlønir
- Stuðul til rentuútreiðslur

**Tillagingar**
Tillagingar skulu gerast, soleiðis at framskrivaði raksturin á grein 3 komandi árini skal lækkast við 8,4 mió.kr. í nýggjum tiltøkum, umframt nøkur tiltøk frá játtanarkørmunum fyri 2014.

**Nýskipanir**
Harumframt eru felagstiltøk fyri allar greinar, sum eru útgjaldsskipanir og útveitan av almennum tænastum. Útgreiningar verða framdar í 2014 av hvussu hetta skal fremjast. Felagstiltøkini væntast at geva 13,5 mió.kr. í sparingum.

**Rakstrarsparingar**
Rakstur á stovnum og virksemi undir grein 3 verður lækkaður við 2,8 mió. kr. í 2015, umframt nøkur tiltøk frá játtanarkørmunum fyri 2014.

**Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2015-2019**

**Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2015-2019**

| **§ 5 Fiskivinnumál** *mió. kr.* | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 168,2 | 167,3 | 175,2 | 173,7 | 173,6 | 173,6 |
| Frávik, FL14 | 5,1 | 4,7 | -6,9 | 4,6 | 4,6 | 4,6 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **173,3** | **172,0** | **168,3** | **178,3** | **178,2** | **178,2** |
| *Innroknað tiltøk frá játtanarkørmunum 2014* | | *0,5* | *1,0* | *1,5* | *1,5* | *1,5* |
| Lønarframskriving | | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **173,3** | **173,5** | **169,8** | **179,8** | **179,7** | **179,7** |
| Tillagingar, JK15 | | -2,3 | -4,6 | -6,9 | -6,9 | -6,9 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **173,3** | **171,2** | **165,2** | **172,9** | **172,8** | **172,8** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving
- Hvalateljingar, ið fara fram umleið 6. hvørt ár skulu gerast í 2015

## Tillagingar

Landsstýrismaðurin ætlar at fremja tillagingar (upp- og niðurraðfestingar) á øki sínum í 2015. Hesar sparingar eru í høvuðsheitum:

### Lækking í ymsum stuðulsskipanum

Fiskimálaráðið fer at eftirhyggja stuðulsskipanirnar fyri at kanna, um onkrar av hesum kunnu lækka. Ætlandi gevur hetta eina sparing á umleið 1,2 mió. kr.

### Rakstrarsparingar

Stovnar fáa ikki játtan til príshækkingarnar, og teir skulu sjálvir finna pening til hetta. Kannað verður eftir, hvussu tænasturnar kunnu skipast bíligari. Millum annað verður kannað eftir, hvørjar tænastur kunnu útveitast. Somuleiðis verður kannað eftir, hvørjar funktiónir kunnu leggjast saman. Samlað geva hesar sparingar áleið 2,3 mió. kr. árliga.

### Brúkaragjøld

Ætlanin er at taka brúkaragjøld fyri ymsar tænastur. Hetta gevur eykainntøkur á umleið 700 tús. kr.

**Rakstrarkarmar fyri § 6 Vinnumál 2015-2019**

| Rakstrarkarmar fyri § 6 Vinnumál 2015-2019 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 6 Vinnumál** ***mió. kr.*** | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 299,7 | 296,7 | 296,4 | 296,4 | 296,4 | 296,4 |
| Framskrivingar | 8,6 | 8,4 | 9,7 | 11,0 | 12,3 | 13,6 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **308,3** | **305,1** | **306,1** | **307,4** | **308,7** | **310,0** |
| *Innroknað tiltøk frá JK14* | *0,0* | *1,9* | *2,2* | *2,2* | *2,2* | *2,2* |
| Lønarframskriving | | 2,4 | 2,4 | 2,4 | 2,4 | 2,4 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **308,3** | **307,5** | **308,5** | **309,8** | **311,1** | **312,4** |
| Tillagingar, JK15 | | -3,1 | -6,2 | -9,3 | -9,3 | -9,3 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **308,3** | **304,4** | **302,3** | **300,5** | **301,8** | **303,1** |

## Framskrivingar
Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving
- Raðfestingin av játtanini til Ferðaráðið heldur fram
- Marknaðarføring av leitimiðum á føroyska landgrunninum heldur fram

Veitingar (lógarbundið) eru framskrivaðar soleiðis í 2015:

- Barsilskipanin, sum er inntøkufíggjað av løntakarum og arbeiðsgevarum, er framskrivað við 1,7 mió. kr. Tá er hædd ikki tikin fyri ætlaðu lógarbroytingini, av tí at broytingin ikki er samtykt enn. Sum lógaruppskotið fyriliggur, verður mett, at útreiðsluvøksturin verður 7 mió. kr. afturat teimum 1,7 mió. kr.

## Tillagingar
Landsstýrismaðurin ætlar at fremja tillagingar á sínum øki, sum í 2015-2017 svara til sparing á 3,1 mió. kr. um árið. Hesar eru í høvuðsheitum.

- Útveiting. Ætlanin er at fara undir at bjóða út farleiðirnar á Oyggjaleiðum.
- Rakstrarsparingar

Rastionaliseringar innan raksturin hjá Strandfaraskipum Landsins. Farið verður undir at endurskoða avtalurnar við veitarar á Bygdaleiðum.

**Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2015-2019**

| **Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2015-2019** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 7 Mentamál** *mió. kr.* | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 946,3 | 945,7 | 943,0 | 940,9 | 941,9 | 941,9 |
| Framskrivingar | 17,2 | 26,0 | 27,8 | 25,6 | 27,0 | 31,7 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **963,5** | **971,7** | **970,8** | **966,5** | **968,9** | **973,6** |
| *Innroknað tiltøk frá játtanarkørmunum 2014* | | *8,7* | *18,7* | *28,1* | *30,1* | *30,1* |
| Lønarframskriving | | 11,4 | 11,4 | 11,4 | 11,4 | 11,4 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **963,5** | **983,1** | **982,2** | **977,9** | **980,3** | **985,0** |
| Tillagingar, JK15 | | -5,0 | -10,0 | -15,0 | -15,0 | -15,0 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **963,5** | **978,1** | **972,2** | **962,9** | **965,3** | **970,0** |

## Framskrivingar og tillagingar

Við fyriliggjandi fíggjarkørmum skulu tillagingar fremjast, sum í 2015 svara til minking í útreiðsluvøkstrinum uppá 13,7 mió. kr. Við framskrivingum og ætlaðu tillagingunum veksur raksturin á § 7 úr 963,5 mió. kr. til 978,1, sum svarar til 14,6 mió. kr. ella 1,5%.

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving
- Fólkaskúlin
- Miðnámsútbúgvingar
- Lestrarstuðul

## Tillagingar og rakstrarsparingar

Ætlanin er í høvuðsheitum at tálma útreiðsluvøksturin við umskipanum í rakstrinum á:

- fólkaskúla- og sernámsfrøðiliga økinum
- miðnámsskúlaøkinum
- hægri útbúgvingar- og granskingarøkinum
- og mentanarøkinum

Arbeitt verður við at skipa bygnaðin í fólkaskúlanum øðrvísi við atliti at ásetingunum í samgonguskjalinum um at skipa størri eindir. Arbeitt verður við uppskoti til, hvussu skúlin skal skipast. Arbeiðið verður liðugt seinni í vár. Somuleiðis verður arbeitt við umskipanum innan sernámsfrøðiliga økið.

Á miðnámsskúlaøkinum eru nýggjar útbúgvingarskipanir settar í verk, bæði innan gymnasialu útbúgvingarnar og yrkisútbúgvingarnar. Farið var undir at útbúgva næmingar eftir nýggju gymnasialu breytaskipanini og yrkisnámi í august í 2013. So hvørt sum nýggju skipanirnar verða settar í verk, verður raksturin skynsamari, m.a. tí at nýggju útbúgvingarnar eru betur samskipaðar, og gomlu skipanirnar halda uppat.

Arbeitt verður eisini við bygnaðarligum broytingum á miðnámsskúlaøkinum fyri at gera raksturin effektivari, og harafturat verður neyðugt at rationalisera raksturin innan aðrar hægri útbúgvingar og skeið fyri at halda karmin og samstundis hava møguleika at bjóða viðkomandi og mennandi útbúgvingar.

**Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsumál 2015-2019**

**Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsumál 2015-2019**

| **§ 11 Heilsumál** *mió. kr.* | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 917,3 | 913,2 | 910,1 | 909,3 | 912,5 | 912,5 |
| Framskrivingar | 9,8 | 19,5 | 20,6 | 22,8 | 25,2 | 34,3 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **927,1** | **932,7** | **930,7** | **932,1** | **937,7** | **946,8** |
| *Innroknað tiltøk frá játtanarkørmunum 2014* | | *11,4* | *22,0* | *30,5* | *35,1* | *35,1* |
| *Innroknaðar minkaðar framskrivingar* | | *0,0* | *3,7* | *7,7* | *11,9* | *16,6* |
| Lønarframskriving | | 8,4 | 8,4 | 8,4 | 8,4 | 8,4 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **927,1** | **941,1** | **939,1** | **940,5** | **946,1** | **955,2** |
| Tillagingar, JK15 | | -5,0 | -10,0 | -15,0 | -15,0 | -15,0 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **927,1** | **936,1** | **929,1** | **925,5** | **931,1** | **940,2** |

## Framskrivingar:

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving er 1,5%, svarandi til 8,4 mió. kr.
- Heilsutrygdarveitingar verða framskrivaðar við 2% prosentum, orsakað av økingini í veitingum
- Serstakur sjúkrahúsheilivágur verður framskrivaður við 3% prosentum, orsakað av økingini í tilbúningum og av at fleiri fólk verða sett í viðgerð
- Serviðgerð uttanlands verður framskrivað við 3% prosentum, orsakað av økingini í viðgerðarmøguleikum og at fleiri fólk verða sett í viðgerð
- Sjúklingatryggingin verður framskrivað, orsakað av øktum tryggingarmálum

Landsstýrismaðurin ætlar at fremja tillagingar, nýskipanir og rakstrarsparingar á øki sínum næstu árini, sum í 2015 svara til eina sparing upp á 16,4 mió. kr.

## Tillagingar

*Psykiatriska økið*
Landsstýrismaðurin fer at fremja tillagingar innan psykiatriska depilin, tá virðilig búviðurskifti hjá liðugt viðgjørdu sjúklingunum á deplinum eru komin í rættlag. Tá ið tey eru flutt í aðrar bústaðir, verður skipað soleiðis fyri, at økispsykiatriin verður raðfest í nøkrum pørtum av landinum, har hon ikki er komin at virka enn. Loysn á málinum hevur samstundis stóran týdning fyri at røkka játtanarkørmunum.

*Liðugt viðgjørdir sjúklingar*
Landsstýrismaðurin umhugsar at taka gjald frá avvarðandi myndugleikum fyri liðugt viðgjørdar sjúklingar, ið uppihalda sær í sjúkrahúsverkinum.

*Umlegging av heilsuverkinum*
Afturat hesum verður farið í holt við at fremja umleggingar av virkseminum í heilsuverkinum, og verður heilsuverkið tá viðgjørt í síni heild.

**Nýskipanir**

*Heilsunýskipan*
"Heilsunýskipanin hevur sum endamál at fáa til vega samanhangandi heilsutænastur, sum svara til ynskini og tørvin hjá tí einstaka, og møta teimum avbjóðingum, sum eru fyri framman, bæði tá ið umræður vaksandi tal av eldri, tøkniligari menning og vaksandi krøvum til viðgerð og viðgerðarmøguleikar."

Visjónin fyri nýskipanina er einføld, men ambitiøs: Føroyingar skulu hava betri møguleika at liva eitt heilsugott lív uttan sjúkur. Hóast setningurin er einfaldur, er loysnin kompleks og samansett. Ikki minst havandi í huga, at fíggjarliga tilfeingið er avmarkað, meðan eftirspurningurin á tænastum veksur.

Vegna økt viðgerðartilboð og økt tal av borgarum, ið gerast eldri, er neyðugt at gera tillagingar við heilsunýskipanini. Aðalorðaskifti hevur verið um heilsunýskipanina, og arbeitt verður við at seta átøk í verk. Ætlanin er, at skipanin skal gera, at fólk hava eitt heilsubetri lív, og at tey sostatt í øðrvísi og minni mun koma at hava brúk fyri heilsuverkinum.

*Apoteksverkið:*
Framleiðsluhølini á Staravegi hjá Apoteksverkinum verða liðug fyrra hálvár 2014, og Apoteksverkið kann fara undir aðra eginframleiðslu av heilivági. Við verandi umsetningi ber til at fremja tillagingar, sum hava týdning fyri at røkka játtanarkørmunum.

Aðrar nýskipanir:
Arbeitt verður eisini við KT-menning, øktum talið av læknum undir útbúgving, at Etiskt ráð verður sett, Neyðhjálp, umframt til Dygd- og trygdarmenningararbeiði.

**Rakstrarsparingar**

*Rationaliseringar innan Heilsutrygdarveitingar*
Arbeitt verður framhaldandi við at gera skipanir, ið málrætta veitingarnar til borgararnar, fyri at lækka útreiðslurnar. Arbeitt verður við at menna umsitingina av heilsutrygdarveitingunum. Hetta fer at styrkja eftirlitið og gera nýtsluna meiri gjøgnumskygda, soleiðis at tað gerst sjónligari, hvar nýtslan kann verða tálmað. Somuleiðis verður arbeitt við at broyta skipanina til veitingar í sambandi við hjálparráð og kostískoyti.

*Rationaliseringar innan Ílegusavnið:*
Arbeitt verður fram ímóti, at Ílegusavnið skal hava ein enn størri part av virkseminum eginfíggjaðan. Í 2015 verður kravið um inntøkur økt. Endamálið er at fáa inntøkur til at fíggja virksemið hjá stovninum, soleiðis at landið fær sín part av síni íløgu í skipanina aftur. Hetta krevur, at stovnurin í størri mun skal arbeiða við marknaðarføring og sølu av upplýsingum og tænastum.

**Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2015-2019**

**Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2015-2019**

| **§ 12 Almannamál** ***mió. kr.*** | **FL 2014** | **Æ 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, JK14 | 1.725,9 | 1.760,3 | 1.756,3 | 1.771,6 | 1.787,9 | 1.787,9 |
| Framskrivingar | -17,4 | 8,6 | 18,5 | 17,9 | 16,7 | 37,9 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **1.708,5** | **1.768,9** | **1.776,0** | **1.789,5** | **1.804,6** | **1.825,8** |
| *Innroknað tiltøk frá JK 14* | | | *25,2* | *31,5* | *37,8* | *37,8* |
| *Røktarheimið á Sýnini flutt til løgu* | *7* | *12* | *12,5* | | | |
| Eldraøkið til kommunurnar | -372,7 | -372,1 | -375,5 | -378,9 | -382,3 | -385,7 |
| **Rakstrarútreiðslur, JK15** | **1.335,8** | **1.396,8** | **1.399,3** | **1.410,6** | **1.422,3** | **1.440,1** |
| Lønarframskriving | | 4,1 | 4,1 | 4,1 | 4,1 | 4,1 |
| Javning | | 7,4 | 7,4 | 7,4 | 7,4 | 7,4 |
| **Rakstrarkarmur við lønarframskriving, JK15** | **1.335,8** | **1.408,3** | **1.410,8** | **1.422,1** | **1.433,8** | **1.451,6** |
| Tillagingar, JK15 | | -10,0 | -15,0 | -20,0 | -20,0 | -20,0 |
| **Rakstrarkarmur eftir tiltøk, JK15** | **1.335,8** | **1.398,3** | **1.395,8** | **1.402,1** | **1.413,8** | **1.431,6** |

## Tillagingar og broytingar í karmi

- Eldraøkið verður flutt til kommunurnar. Rakstrarkarmurin verður lækkaður við 372,1 mió. kr. í 2015, og karmurin til lógarbundnar útreiðslur verður lækkaður við 12 mió. kr.
- Studningslán eru flutt til løgukarmin, og rakstrarkarmurin verður lækkaður við 7 mió. kr. í 2015

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2015:

- Lønarframskriving er 1,5%
- Nýggi stovnurin fyri børn og ung við fjølbreki í Eysturoynni letur upp í ár, og verandi stovnur, Reiðrið, verður niðurlagdur. Játtanin verður hækkað við 0,3 mió. kr. til fult virksemi
- Sambýli í Tórshavn til fólk við sálarsjúku letur upp í ár, og játtanin verður í 2015 hækkað við 2,5 mió. kr. til fult virksemi
- Eftir ætlan lata vardu bústaðirnir í Norðoyggjum og Eysturoy til fólk við serligum tørvi upp í juni 2015. Til hetta endamál eru settar av 10,9 mió. kr. í 2015. Játtanin í 2016 er tí framskrivað við 7,8 mió. kr.
- Lagt er upp fyri, at virknis- og umlættingardepilin á Sandi letur upp í 2016. Játtanin til endamálið er tí hækkað við 3 mió. kr.
- Løgtingsval og Fólkatingsval verður í 2015. Til endamálið eru avsettar 3,2 mió. kr.
- Lagt er upp fyri inntøkum á 1,2 mió. kr. orsakað av afturgjaldi av lánum til kommunurnar í Vágum

Veitingar (lógarbundið) eru framskrivaðar soleiðis í 2015:

- Framskrivingar av fólkatalinum 67 ár og eldri vísa, at neyðugt verður at hækka útreiðslurnar til fólkapensjón við 21 mió. kr.
- Barnavernd verður hækkað við 1,5 mió. kr., orsakað av, at einstakar fyriskipanir kunna vera sera kostnaðarmiklar
- Lagt er upp fyri javning svarandi til 1,5%
- Fyritíðarpensjón verður framskrivað 7,4 mió. kr.
- Arbeiðsfremjandi tiltøk verða framskrivað við 5,5 mió. kr.
- Vanlig forsorg verður framskrivað við 4,3 mió. kr.
- Dagpeningaskipanin verður framskrivað við 2,6 mió. kr.
- Aðrar lógarbundnar játtanir verða framskrivaðar við 1,3 mió. kr. vegna økt virksemi

**Tillagingar og sparingar**
Tillagingar skulu gerast, soleiðis at framskrivaði raksturin á grein 12 í 2015 skal lækkast við 10 mió.kr. í nýggjum tiltøkum.

**Nýskipanir**
Pensjónsskipan: Vegna økt tal av eldri borgarum er neyðugt at gera tillagingar í pensjónsskipanini, um útreiðslurnar skulu tálmast. Sambært játtanarkørmunum fyri 2014 skulu útreiðslurnar í 2018 verða minkaðar við 37,8 mió. kr.

**Játtanarkarmar fyri § 20 Inntøkur 2015-2019**

| Játtanarkarmar fyri § 20 Inntøkur 2015-2019 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **Meting 2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** |
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.655,1 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 | 4.676,7 |
| Framskrivingar | 21,6 | -88,7 | -27,4 | 29,6 | 88,6 | 146,6 |
| Nýggj tiltøk | - | 200,0 | 252,5 | 252,5 | 252,5 | 252,5 |
| Eldraøkið til kommunurnar | - | -372,1 | -375,5 | -378,9 | -382,3 | -385,7 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.676,7** | **4.415,9** | **4.526,3** | **4.579,9** | **4.635,5** | **4.690,1** |

## Rentuútreiðslur og -inntøkur

Fyritreytirnar eru metta gongdin í skuldini hjá landskassanum, í fíggjarognum landskassans og í rentustøðinum. Eisini er lagt upp fyri ætlanunum um at tillaga reglurnar fyri samansetingina av virðisbrøvum í umsitingini av landsins gjaldføri.

## Skatta- og avgjaldsinntøkur

Flestu skatta- og avgjaldsjáttanir eru framskrivaðar við 1,5% uttan í teimum førum har ið fyritreytirnar fyri játtanina tala fyri tí og har ið frávik eru gjørd.

Inntøkurnar frá vanligum landsskatti og meirvirðisgjaldi hava verið mettar ov høgt bæði í 2012 og 2013. Inntøkurnar frá vanligum landsskatti eru framskrivaðar við umleið 3% í 2015 sammett við nýggjastu metingarnar fyri 2014 og umleið 1,5% eftir hetta. Somu meginreglur eru brúktar, tá ið umræður inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi.

Inntøkurnar frá kolvetnisskatti, persónar, eru framskrivaðar grundað á ætlaða leitivirkseminum í 2014. Sama meginregla er brúkt viðvíkjandi inntøkum frá kolvetnisskatti, feløg.

Inntøkur frá tilfeingisskatti og avgjaldi á fiskatilfeingi. Eftir galdandi lóg fellur skatturin og avgjaldið burtur við ársenda 2014.

Sum nýggj tiltøk eru tikin við tilfeingisskattur og loyvisgjald á alivinnuna, sum verða í gildi frá 2015 og frameftir, umframt at arbeitt verður við øðrum inntøkutiltøkum. Í 2015 eru nýggj inntøkutiltøk fyri mettar 200 mió. kr.

## Løguætlan 2015-2019

Talvurnar niðanfyri vísa løguætlanina hjá landsstýrinum fyri árini 2015-2019 og játtanina fyri 2014. Løgukarmurin í fíggjarlógaruppskotinum 2014 er 299 mió. kr., harav 22 mió. kr. eru settar av til umvæling av Røktarheiminum á Sýnini og til partafelagið, sum skal gera Eysturoyar- og Sandoyartunnilin.

Árligi løgukarmurin í langtíðarløguætlanini fyri 2015 – 2025, er millum 280 mió. kr. til 319 mió. kr. Samlaða løgurnar á fíggjarlógini fyri 2014 eru 299 mió. kr., men 179 mió. kr. eru fluttar fram frá farnum fíggjarárum, og veruligi løgukarmurin er tí 478 mió. kr. samanlagt í 2014.

| **Løgujáttan fyri 2015** | |
|---|---|
| *Mió. kr.* | **2015** |
| §1 Løgtingið | 0,0 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 2,0 |
| §3 Fíggjarmál | 74,6 |
| §5 Fiskivinnumál | 0,0 |
| §6 Vinnumál | 32,0 |
| §7 Mentamál | 121,0 |
| §11 Heilsumál | 35,0 |
| §12 Almannamál | 31,3 |
| **Løgujáttan tilsamans** | **295,9** |

| **Løguætlan fyri 2015-2019** ***(mió. kr.)*** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** |
| **Løgur § 1 - § 12 tilsamans** | **295.850** | **252.400** | **285.900** | **282.900** | **288.850** |

### Frágreiðing um løguætlanina

Niðanfyri er í høvuðsheitum greitt frá størstu íløgunum næstu árini, sum eru byrjaðar ella fara í gongd í 2015.

**Skúladepilin við Marknagil** fer eftir verklagslógini at kosta 515 mió. kr. Játtanin í 2014, við framflyting frá farnum fíggjarárum er 150 mió. kr., og 263,5 mió. kr. verða játtaðar samanlagt næstu tvey árini, til tess at gera verkætlanina lidna.

Løgujáttanin til **Landssjúkrahúsið** verður brúkt, sum tilskilað í løgtingslóg nr. 46. frá 10. mai 2013, um broyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið. Næstu árini verða íalt 372 mió. kr. játtaðar til endamálið.

**P/F Skálafjarðar- og Sandoyartunnilin** verður stovnað, og 400 mió. kr. verða játtaðar til felagið í einum 10 ára skeiði. Tó bert 5 mió. kr. í 2015, og játtanin hækkar síðani stigvíst næstu árini.

Arbeiðið við **Viðareiðistunlinum** heldur á, og 115 mió. kr. verða játtaðar afturat til verkætlanina.

Aðrar størri íløgur eru millum annað **Umvæling av almennum bygningum** fyri 25 mió. kr. árliga. Nýtt **Nólsoyarskip** fyri 45 mió. kr., **Studentaskúlin- og HF-skeið í Eysturoy** fyri 12 mió. kr., **Tekniski skúlin í Klaksvík** fyri 12 mió. kr., **Sambýli í Tórshavn** fyri 10,6 mió. kr., **Røktarheimið á Sýnini** fyri 24,5 mió. kr. og **Virkis- og umlættingardepil á Sandoynni** fyri 7,2 mió. kr.

**Løgur seinri, til 2024**

**Vegurin omanfyri Skálafjørð** verður raðfestur árini 2018-2021, og 50 mió. kr. verða játtaðar til endamálið. Til **Innkoyringarvegin til Havnar** verða játtaðar 94 mió. kr. samanlagt í árunum 2018-2020. Til **Farleið til Dals** verða 43,5 mió. kr. játtaðar.

**Hvalbiartunnil** verður raðfestur árini 2018-2021 fyri 165 mió. kr. **Tunnil millum Gøtudal/Kambsdal og Skálafjørð** verður gjørdur árini 2021-2024 fyri 122 mió. kr. **Farleið til Fámjin** verður raðfest árini 2022-2024, fyri 70 mió. kr. **Tunlarnir norður um Fjall** verða bygdir árini 2021-2024, fyri 265 mió. kr.

Harafturat verður **Tjørnuvíkarvegurin** tryggjaður fyri 25 mió. kr. Til **Inni í Fjørð, Kollafjørður** verða 27 mió. kr. játtaðar. Til tess at dagføra **Leirvíkar- og Kollfjarðartunnilin** verða 50 mió. kr. játtaðar og til farleið til Vestmanna verða 20 mió. kr. játtaðar. Harumframt eru onnur tiltøk.

Til **íløgur og umvælingar av skipum** verða 53 mió kr. játtaðar.

Innan mentamál verður **Fróðskaparsetrið** raðfest árini 2020-2024 fyri 55,2 mió. kr., **Tjóðleikhúsið** fær játtaðar 45 mió. kr. árini 2017- 2019 og **Søvn Landsins** fáa játtað 49 mió. kr. árini 2020-2023..

Innan almannamál fær **Stovnur fyri heilaskadd** játtaðar 14 mió. kr., **Sambýli til fólk við sálarsjúku** 21,8 mió. kr., og til tvey **Sambýli til menningartarnað** samanlagt 33,8 mió. kr. Aðrar løgur enn omanfyri nevndu, verða eisini framdar.

**Kostnaður**

Kostnaðin fyri verkætlanir, serliga tær sum verða framdar seinri ár, er sera ilt at meta um. Tað valdast prísstøði, játtanir, arbeiðsgongd, hvør loysn verður vald, tí verkætlanir verða mangan broyttar, og annað.

# Fylgiskjal A: Konjunkturjavnað framleiðsla og konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran

*Metingar av konjunkturjavnaðari framleiðslu og konjunkturjavnaðum úrsliti hjá tí almenna kunnu frameftir vera týðandi íkast, tá ið fíggjar- og búskaparpolitikkur verður lagdur til rættis. Í regluverkinum viðvíkjandi fíggjarpolitikkinum í ES er ásett, at limalond skulu brúka uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti hjá tí almenna, tá ið fíggjarpolitikkurin verður lagdur til rættis. Frágreiðingin niðanfyri er ein ávegis frágreiðing um konjunkturjavnaða framleiðslu og úrslit fyri almenna geiran í Føroyum. Ætlanin er at menna meira nágreiniligar uppgerðarhættir, so hvørt sum vitanin og hagtølini innan økið mennast næstu árini.*

## Høvuðsniðurstøður í frágreiðingini

- Úrslitini í frágreiðingini benda á, at tað almenna tilsamans hevði konjunkturjavnað hall á umleið 1% av BTÚ í 2012
- Til sammetingar høvdu flestu OECD-lond konjunkturjavnað hall á 1-3% av BTÚ í 2012
- Undantøk eru til dømis USA, Stóra Bretland, Japan og Írland, sum hava munandi størri hall
- Hallið svarar til 100-150 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í BTÚ í 2012
- Bróðurparturin av konjunkturjavnaða hallinum stavar sannlíkt hjá tí almenna frá landskassahallinum, t.e. frá hallinum hjá landinum
- Eftir valda uppgerðarháttinum var lítil lágkonjunkturur ella *normalkonjunkturur* í 2012

## Inngangur

Metingar av konjunkturjavnaðari framleiðslu og úrsliti fyri almenna geiran kunnu frameftir (saman við øðrum ábendingum) vera týðandi íkast, tá ið fíggjar- og búskaparpolitikkur verður lagdur til rættis. Konjunkturjavnað úrslit hjá tí almenna verður aðrastaðni vanliga nevnt Cyclically Adjusted Budget Balance. Konjunkturjavnaða úrslitið vísir, hvat úrslitið fyri almenna geiran hevði verið, um ávirkanirnar frá konjunkturunum á samfelagsbúskapinum vóru tiknar burturúr, t.v.s. um normalkonjunkturur var í samfelagnum. Hetta úrslitið nevna vit konjunkturjavnaða úrslitið fyri almenna geiran tilsamans.

Útrokningar og úrslit í sambandi við konjunkturjavnaða almenna úrslitið skulu lesast við fyrivarnum og ikki ov bókstavliga, men kunnu saman við øðrum vísitølum geva ábending um støðuna og haldførið í fíggjarpolitikkinum yvir longri áramál. Talva A1 vísir uppgerðir hjá IMF yvir konjunkturjavnað úrslit fyri tað almenna býtt á útvald lond og ár. Talva A2 vísir uppgerðir yvir konjunkturjavnaða hallið í Danmark, alt eftir hvør uppgerðarháttur verður brúktur og hvør stovnur hevur staðið fyri uppgerðini. Á talvu A2 sæst, at stórur munur er á úrslitunum, alt eftir hvør uppgerðarháttur verður brúktur.

**Talva A1 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran býtt á lond**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | |
| Ísland | 4,9 | 3,2 | -17,8 | -9,6 | -7,4 | -4,8 | -3,3 | -2,4 | -2,0 | -1,6 |
| Týskland | -2,2 | -1,2 | -1,3 | -1,1 | -3,4 | -1,1 | 0,0 | -0,1 | 0,0 | 0,0 |
| USA | -2,5 | -2,9 | -5,0 | -7,8 | -8,0 | -7,3 | -6,3 | -3,9 | -3,2 | -2,7 |
| Stóra Bretland | -4,6 | -5,3 | -6,6 | -10,3 | -8,4 | -6,0 | -5,8 | -4,0 | -3,9 | -3,2 |
| Evruøkið tilsamans | -2,2 | -2,2 | -3,3 | -4,8 | -5,0 | -3,7 | -2,7 | -1,6 | -1,2 | -1,1 |

Kelda: IMF. Fiscal Monitor. Taxing Times, oktober 2013.

**Talva A2 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran í Danmark, tríggir uppgerðarhættir**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | |
| Danmark (IMF) | 3,4 | 3,2 | 1,9 | -1,0 | -1,5 | -0,6 | -2,2 | 0,5 | -0,1 | -1,3 |
| Danmark (Økonomisk Råd) | 0,8 | 0,8 | 0,5 | -1,2 | -1,9 | -1,3 | -1,7 | -0,8 | -0,7 | -0,5 |
| Danmark (Finansministeriet) | 1,5 | 1,8 | 1,9 | -0,7 | -1,7 | -0,9 | -0,8 | -0,2 | -0,5 | -0,4 |

Kelda: IMF, Finansministeriet og Økonomisk Råd.

Í frágreiðingini verður greitt frá teimum mannagongdum, sum verða nýttar, tá ið Fíggjarmálaráðið metir um tað sonevnda konjunkturfrávikið í búskapinum og um konjunkturjavnað úrslitið í almenna geiranum. Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðslu og konjunkturjavnaða framleiðslu. Konjunkturfrávik verður aðrastaðni ofta nevnt outputgap, og konjunkturjavnað framleiðsla verður vanliga nevnd potential output.

## Fyrivarni og óvissur í sambandi við uppgerðirnar

Uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri tað almenna umfata almenna geiran sum heild, t.e. land, kommunur og almennar grunnar undir einum. Skal nakað høpi vera í uppgerðum av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran, er neyðugt at brúka uppgerðir av tí almenna *tilsamans*, soleiðis at úrslitini ikki ávirkast av broytingum innan einstøku almennu geirarnar, broyttum uppgerðarhættum ella tað, at almennar útreiðslur verða fluttar millum ymiskar almennar myndugleikar. Gongdin í framleiðsluni javnað fyri konjunkturstøðuna verður brúkt í metingum av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran.

Eitt fyrivarni í sambandi við uppgerðir av konjunkturjavnaðari framleiðslu og konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran, er at í smásamfeløgum er torført at javna úrslitið í almenna geiranum fyri ávirkanir frá konjunkturstøðuni. Fólkafráflyting og fólkatilflyting ávirka búskapin sum heild og almenna búskapin nógv, umframt at sveiggini eru størri í smáum búskapum, sum hevur við sær størri óvissu.

Harafturat kann búskapargongdin í Føroyum sveiggja nógv frá ári til ár, millum annað orsakað av náttúrugivnum orsøkum og av tí at tilfeingisvinnurnar hava stóran týdning fyri samfelagsbúskapin. Sum dømi kann verða nevnt, at serlig viðurskifti í útflutningsvinnum í 2010 gjørdu, at BTÚ vaks umleið 7% tað árið. Her verður hugsað um størri nøgdir av makreli, góðar prísir á alifiski og somuleiðis stórar nøgdir av útfluttum alifiski.

At fólkafráflytingin kann vera óstøðug í Føroyum hevur millum annað við sær, at tað er torført at máta sonevnda konjunkturfrávikið. Aðrastaðni kann konjunkturfrávikið fyri ein part mátast við arbeiðsmarknaðarhagtølum, men hetta er meira torført í Føroyum. Føroyska arbeiðsloysið tykist at hava eitt hámark, sum arbeiðsloysið ikki leingi er omanfyri, áðrenn fólkafráflytingin av landinum veksur.

Tey ymisku fyrivarnini eru gjølliga viðgjørd í bókmentunum innan hetta økið. Víst kann m.a. verða á keldurnar frá Økonomisk Råd og Finansministeriet, sum eru nevndar í bókmentalistanum aftast, har greitt verður frá eini røð av fyrivarnum og óvissum í sambandi við uppgerðir av konjunkturjavnaða úrslitinum hjá tí almenna. Fíggjarmálaráðið hevur somu fatan um hesar óvissur og fyrivarni. Roknast kann bara við, at tølini um konjunkturjavnaða úrslitið geva nakrar ábendingar, sum saman við fleiri øðrum ábendingum kunnu vera hentar í viðgerðini av samlaða fíggjar- og búskaparpolitikkinum.

## Útrokningarháttur og mannagongd

Bruttovirðisøking verður nýtt sum vísital fyri framleiðsluna. Hildið verður, at bruttovirðisøking er mest viðkomandi vísital fyri tað búskaparligu framleiðslu, sum fer fram her á landi av borgarum og virkjum, sum eru heimahoyrandi her. Annar møguleiki er sjálvsagt at brúka bruttotjóðarúrtøku, bruttotjóðarinntøku ella arbeiðsmarknaðarhagtøl sum vísitøl fyri framleiðsluna, ella at samanviga fleiri arbeiðsmarknaðarhagtøl til eitt vísital.

Útrokningar vísa, at tað hevur ikki stóran týdning fyri úrslit ella niðurstøður, um bruttotjóðarúrtøka ella bruttotjóðarinntøka í staðin vera brúkt sum vísitøl fyri framleiðsluna. Á myndunum A1 til A4 á bls. 42 eru vístar útrokningar av konjunkturjavnaða úrslitinum fyri tað almenna, um støddin "lønir og atknýtt gjøld" úr tjóðarroknskapinum í staðin verður brúkt sum vísital fyri framleiðslu. Myndirnar vísa, at konjunkturgongdin og konjunkturfrávik broytast nakað, tó uttan at broyta niðurstøður grundleggjandi. Seinni er ætlanin at royna at samanviga bruttovirðisøkingina og "lønir og atknýtt gjøld" til eitt vísital, sum kann hugsast at vera eitt neyvari vísital fyri framleiðsluna í Føroyum.

Einastu veruligu mát, sum finnast av búskapargongdini í føstum prísum í Føroyum, eru arbeiðsmarknaðarhagtøl, arbeiðsloysi, løntakarar og arbeiðsfjøld. Hesi hagtøl eru kortini torfør at samanviga til eitt vísital, sum vísir gongdina í framleiðsluni. Til at máta samlaða árinið á búskapin av konjunkturstøðuni, verður tó hildið, at frægast er at taka støði í tjóðarroknskapinum, av tí at tað er í tjóðarroknskapinum, at til ber at lesa samlaðu ávirkanina, sum konjunkturstøðan hevur á búskapin og framleiðsluna her á landi. Vansin við at brúka arbeiðsmarknaðarhagtøl sum vísital fyri framleiðsluna í føstum prísum er, at tey geva bara eina løtumynd av støðuni á arbeiðsmarknaðinum.

Konjunkturjavnaða úrslitið í almenna geiranum verður gjørt upp við støði í konjunkturjavnaðu framleiðsluni og konjunkturfrávikinum. Konjunkturjavnaða framleiðslan er meting av, hvat framleiðslan (bruttovirðisøkingin) hevði verið júst nú, um normalkonjunkturur var í samfelagnum. Er konjunkturfrávikið hægri enn 0, er hákonjunkturur í samfelagnum, og er konjunkturfrávikið lægri enn 0, er lágkonjunkturur í samfelagnum. Vit kunnu lýsa konjunkturfrávikið við sambandinum:

$$\textit{Staðfest framleiðsla} = \textit{konjunkturjavnað framleiðsla} + \textit{konjunkturfrávik} \tag{1}$$

Konjunkturfrávikið verður brúkt, tá ið mett verður um haldførið í fíggjarpolitikkinum í løtuni og um tað fíggjarpolitiska rásarúm, sum almennir myndugleikar hava til fíggjar- og búskaparpolitisk tiltøk av ymiskum slagi.

Fleiri ymiskir útrokningarhættir eru til uppgerðir av konjunkturfrávikinum.[1] Flestu lond í Vesturheiminum hava drúgvar royndir av at gera upp konjunkturfrávik og konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran. Harafturat hava millumtjóða stovnar sum OECD, IMF, ES og flestu miðbankar hvør sín útrokningarhátt til uppgerðir av konjunkturfráviki og konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran.

Útrokningarhættirnir eru ikki eins, men fleiri av stigunum í útrokningunum eru at kalla eins, og í stóran mun er talan um felags tilgongd við ávísum frávikum. Útrokningarhættirnir, sum nýttir verða, eru fyrst og fremst avmarkaðir av teimum hagtølum, sum eru tøk, og tí eru útrokningarhættirnir ymiskir.

Felags fyri allar hættirnar er, at fyri at fáa líkinda úrslit krevjast serstakliga góð og umfatandi hagtøl um búskapin sum heild og um almenna búskapin. Til dømis krevja útrokningarnar uppgerðir av tjóðarroknskapinum í føstum prísum, sum ikki eru tøkar hjá okkum enn. Fíggjarmálaráðið ætlar at menna meira nágreiniligar útrokningarhættir av konjunkturfrávikinum og av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran, so hvørt sum hagtalsgrundarlagið verður betri næstu árini.

Allir uppgerðarhættir, sum nýttir verða aðrastaðni, hava til felags, at gongdin í búskapinum verður mátað í føstum prísum, meðan almennar útreiðslur og inntøkur, tað er almenni búskapurin, verða mátaðar í ársins prísum. Hagtølini, sum brúkt verða her, fevna um tíðarskeiðið 2001-2012. Í seinni uppgerðum er ætlanin at royna at leingja tíðarrøðina.

## Konjunkturfrávik og konjunkturjavnað úrslit

Framleiðslan (bruttovirðisøkingin) verður javnað fyri ávirkanir frá konjunkturum við einum sonevndum *Hodrick-Prescott* (HP) filtri. Fleiri vansar eru við HP-filtrinum, men avmarkaðu hagtølini viðvíkjandi føroyska búskapinum tala kortini fyri, at HP-filtrið er frægasta amboðið til uppgerðir av konjunkturfrávikinum. HP-filtrið er ein einfaldur hagfrøðisligur uppgerðarháttur, sum býtir tíðarrøðir í sonevnda *trendgongd* (høvuðsgongd) og í tíðaravmarkað sveiggj. Størstu vansarnir við HP-filtrinum eru, at tað kann vera óneyvt í endunum á tíðarrøðum. Hetta hevur millum annað við sær, at úrslitini fyri árini 2001 og 2012 ikki eru eins áhugaverd sum til dømis úrslitini fyri 2008 og 2009. Ein annar vansi er, at HP-filtri sigur einki um orsøkirnar til tey sveiggj, sum eru í tíðarrøðum.

Framleiðslan verður gjørd upp sum bruttovirðisøking býtt við brúkaraprístalinum. Óvissur eru sjálvsagt við hesum hátti at gera upp framleiðsluna. Hildið verður kortini, at henda uppgerðin við ávísum fyrivarnum kann nýtast sum ábending um gongdina í framleiðsluni í føstum prísum. Størsta óvissan í hesum sambandi er óivað, at framleiðsla og nýtsla kunnu ikki heilt samanberast í Føroyum. Framleiðslan fevnir í mestan mun um fiskivinnu, alivinnu, fiskavørur, umframt ávísar ídnaðarvinnur og tænastuvinnur, meðan nýtslan í mestan mun fevnir um innfluttar vørur. Hugsandi er tí, at brúkaraprístalið er ein óneyv ábending um prísgongdina í føroysku útflutningsvinnunum.

Fleiri hættir eru at rokna konjunkturfrávikið. Hátturin at rokna konjunkturfrávikið við tjóðarroknskapinum og HP-filtri, sum verður nýttur her, er ein einfaldur háttur, sum er avmarkaður av teimum hagtølum, sum eru tøk viðvíkjandi føroyska búskapinum. Fyrimunurin við

---

[1] Sí til dømis De Økonomiske Råd, *Strukturel saldo til Dansk Økonomi, efterår 2012* ella upprit frá Finansministeriet, *Finansministeriets beregning af gab og strukturelle niveauer*. Sí eisini s. 73-75 í Budgetoversigt 2, august 2013 frá Finansministeriet.

uppgerðarháttinum, sum verður brúktur her, er, at útrokningarnar kunnu lættliga dagførast, so hvørt nýggjari hagtøl verða tøk.

Her kann verða nevnt, at hátturin at gera upp konjunkturfrávik og konjunkturjavnað úrslit í almenna geiranum, sum nýttur verður her, er meinlíkur uppgerðarhættum, sum áður hava verið nýttir av Finansministeriet og av OECD.[2] Fíggjarmálaráðið ætlar sum nevnt at menna meira nágreiniligar og framkomnar útrokningarhættir av konjunkturfrávikinum og konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran, so hvørt sum talgrundarlagið verður betri í næstum.

Næsta stig er at lýsa, hvussu úrslitið fyri almenna geiran ávirkast av konjunkturstøðuni. Vit kunnu lýsa sambandið millum staðfesta úrslitið fyri almenna geiran og konjunkturjavnaða úrslitið soleiðis:[3]

(2) *Konjunkturjavnað úrslit = staðfest úrslit – ískoyti til úrslit frá konjunkturstøðu*

Næsta stig er at meta um ískoytið til úrslitið í almenna geiranum frá konjunkturstøðuni, t.e. hvussu stóra ávirkan konjunkturstøðan hevur á úrslitið í almenna geiranum. Til ber at lýsa hetta við sambandinum:

(3) *Ískoyti til úrslit frá konjunkturstøðu = ε * konjunkturfrávik*

Ávirkanin frá konjunkturstøðuni á úrslitið í almenna geiranum kann lýsast við støddini $\varepsilon$, sum eisini verður nevndur ein *búskettfaktorur*. Búskettfaktorurin vísir, hvussu nógv úrslitið fyri almenna geiran broytist, tá ið konjunkturfrávikið broytist.

Til ber at meta um støddina á $\varepsilon$ við elastisitetunum ($E_i$) fyri almennar inntøkur og útreiðslur, t.e. fyri sonevndar *búskettlutir B*. Vit kunnu meta um støddina $E_i$ við regresjónslinjuni:

(4) $$B - frávik_{it} = E_i * (y - frávik_t) + e_i$$

$B - frávik_{it}$ er frávikið millum búskettlut $i$ og trendlinju $t$ fyri sama búskettlut $i$, meðan $y - frávik_t$ er frávikið millum framleiðsluna $y$ (bruttovirðisøking) og trendlinjuna fyri framleiðsluna, og $e_i$ er vanliga restliðið í regresjónslinjum. Í báðum førum verður frávikið mátað sum frávik í % frá trendlinju. Til at finna trendlinju verður í hesum føri eins og áður brúkt tað sonevnda HP-filtrið.

[2] Sí til dømis upprit frá Finansministeriet, *Beregning af den strukturelle offentlige saldo*, arbejdspapir nr. 17/2005, ella frágreiðing frá Økonomisk Råd í Grønlandi frá 2011, *Økonomisk Råds rapport, 2011* (sí serliga s. 149-159 í fylgiskjali), ella OECD, Economics Department Working Paper No. 434, *Measuring cyclically-adjusted budget balances for OECD countries*, 2005.

[3] Her eigur at verða nevnt, at umframt *ískoyti til úrslit frá konjunkturstøðu*, sum rættað verður fyri í (2), eigur eisini at verða rættað fyri broytingar í skatta- og avgjaldssatsum, sum ikki eru varandi, umframt fyri óvanligar og tíðaravmarkaðar serinntøkur og –útreiðslur. Hetta er bara fyri ein part gjørt í útrokningunum omanfyri. Orsakað av viðurskiftum, sum eru serlig í Føroyum, hevði tað ikki broytt úrslit ella niðurstøður stórvegis, um roynt varð at rætta fyri óvanligum og tíðaravmarkaðum inntøkum og útreiðslum. Her verður til dømis hugsað um, at avkastið av pensjónsuppsparing ikki verður skattað árliga í Føroyum og fastognarskattir eru ikki, umframt at tað almenna enn ikki fær skattainntøkur frá olju- ella gassframleiðslu. Her verður sæð burtur frá skattainntøkum frá leitivirksemi í føroyskum øki.

Við at sameina (2) og (3) fæst sambandið:

(5) *Konjunkturjavnað úrslit = staðfest úrslit – ε * konjunkturfrávik*

Talvurnar A3 og A4 niðanfyri taka samanum metingar av $E_i$ fyri ymiskar búskettlutir[4] og eitt samanvigað tal fyri $E$. Samlaði búskettfaktorurin, ε, er síðani støddin á $E$ rættað fyri lutfallið millum samlaðar almennar inntøkur og útreiðslur býtt við BTÚ.[5] Vit kunnu siga, at støddin ε er %-broytingin í úrslitinum hjá tí almenna fyri hvørja %-broyting í konjunkturfrávikinum í búskapinum.

**Talva A3 Almennar inntøkur og útreiðslur og elastisitetir**

| | % av BTÚ í 2012 | Elastisitetur, $E_i$ |
|---|---|---|
| **Rakstrarinntøkur (a)** | **53,7** | **0,75** |
| 1. Rentuinntøka, vinningsbýti o.a. | 2,0 | -0,18 |
| 2. Skattir og sosial gjøld * | 44,7 | 0,89 |
| 3. Aðrar rakstrarflytingar, inntøkur | 7,0 | 0,16 |
| **Kapitalinntøkur (b)** | **0,1** | **-0,71** |
| **Inntøkur samanlagt (a + b = c)** | **53,8** | **0,75** |
| | | |
| **Rakstrarútreiðslur (d)** | **48,4** | **-0,39** |
| 1. Rentu- og aðrar ognarútreiðslur | 1,5 | -1,18 |
| 2. Vinnustuðul | 1,1 | 0,03 |
| 3. Aðrar rakstrarflytingar, útreiðslur | 14,7 | -0,67 |
| 4. Almenn nýtsluútreiðsla | 31,2 | -0,24 |
| **Kapitalútreiðslur (e)** | **7,1** | **0,30** |
| 1. Bruttoíløgur ** | 7,0 | 0,12 |
| 2. Aðrar kapitalútreiðslur | 0,1 | 4,05 |
| **Útreiðslur samanlagt (d + e = f)** | **55,6** | **-0,27** |
| | | |
| **Samanvigaður elastisitetur, *E* ***** | | **0,59** |
| **Mettur búskettfaktorur, ε** | | **0,64** |

* Roynt hevur verið at javna skattir og sosial gjøld fyri ávísar serinntøkur, m.a. kapitalvinningsskatt, avgjøld á fiskatilfeingi og uppboðssøluna av fiskatilfeingi, sum var í 2011.

** Roynt hevur verið at javna bruttoíløgurnar fyri óvanliga nógvar almennar íløgur í 2008 orsakað av nógvum íløgum hjá kommununum tað árið. Úrslit ella niðurstøður broytast ikki avgerandi, hóast roynt verður at javna fyri óvanligar inntøkur ella útreiðslur.

*** Samanvigaður elastisitetur, *E*, er munurin á elastisitetunum fyri inntøkur og útreiðslur á almenna búskettinum, samanvigað eftir teirra parti av BTÚ í 2012.

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

[4] Vanligi hátturin við *ordinary least squares* metingum verður brúktur.

[5] T.e., búskettfaktorurin, ε, er støddin $E$ *normerað* við lutfallinum millum samlaðar almennar inntøkur og útreiðslur og BTÚ í 2011, sum var umleið 1,1.

**Talva A4 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | | |
| Staðfest alment úrslit (a) | 4,4 | 1,8 | -2,3 | -1,8 | 2,0 | 2,1 | -2,8 | -4,8 | -3,5 | -2,1 | -1,8 |
| Ískoyti frá konjunkturstøðu (b) | 1,5 | -2,3 | -1,6 | -2,1 | 3,3 | 3,1 | -1,8 | -2,1 | 1,2 | 0,6 | -0,6 |
| Konjunkturjavnað úrslit (c = a-b) | 2,9 | 4,1 | -0,7 | 0,3 | -1,3 | -1,0 | -1,0 | -2,7 | -4,7 | -2,7 | -1,2 |
| Konjunkturfrávik | 2,4 | -3,5 | -2,5 | -3,3 | 5,2 | 4,8 | -2,8 | -3,3 | 1,8 | 1,0 | -0,9 |

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Metingarnar omanfyri benda á, at konjunkturstøðan í búskapinum hevur eina ávísa ávirkan á úrslitið í almenna geiranum, men at ávirkanin á almenna úrslitið er nakað minni enn ávirkanin er í fleiri øðrum londum í Vesturheiminum. Grundað á úrslitini í talvu A3, kann búskettfaktorurin, $\varepsilon$, metast at vera um 0,6-0,7 í Føroyum.[6]

Hetta merkir, at almenni geirin í Føroyum javnar gongdina í búskapinum nakað millum konjunktursveiggini. Almenni geirin í Føroyum hevur kortini ikki eins stóra ávirkan á búskapin og til dømis tað almenna hevur í størri OECD-londum. Ein orsøk er helst, at teir sonevndu automatisku stabilisatorarnir hava størri ávirkan í OECD-londum, har ið sveiggini í búskapinum í størri mun stava frá heimamarknaðunum og harvið hava stóra ávirkan á almenna búskapin og serliga á almennu inntøkurnar. Sveiggini í føroyska búskapinum stava vanliga frá okkara útflutningsmarknaðum. Hesi sveiggj ávirka ikki almenna búskapin eins nógv og skiftandi umstøður á heimamarknaðunum gera.

## Niðurstøður og úrslit

Myndirnar A1-A4 taka samanum úrslitini av metingunum. Úrslitini benda á, at gongdin við vaksandi halli síðstu árini bara lutvíst stavar frá, at konjunkturstøðan er versnað síðstu 4-5 árini. Gongdin stavar í størri mun frá, at almennu útreiðslurnar eru vaksnar nógv, meðan inntøkurnar ikki eru vaksnar samsvarandi. Tilsamans hevur hetta givið verri fíggjarjavna millum almennar inntøkur og útreiðslur.

Úrslitini omanfyri benda á, at tað almenna hevur konjunkturjavnað hall á umleið 1% av BTÚ (talva A4), sum ikki kann væntast at hvørva aftur av sær sjálvum, hóast konjunkturstøðan batnar næstu árini. 1% av BTÚ svarar til 100-150 mió. kr. í 2012. Til sammetingar kann verða nevnt, at flestu OECD-lond í 2012 høvdu konjunkturjavnað hall á 1-3% av BTÚ. Undantøk eru til dømis USA, Stóra Bretland, Japan og Írland, sum hava munandi størri hall (sí talvurnar A1 og A2 á bls. 41).

Síðstu árini hevur tað almenna havt hall serliga í landskassanum, meðan úrslitini hjá kommununum og sosialu grunnunum hava verið at kalla í javnvág. Tí bendir nógv á, at meginparturin av tí konjunkturjavnaða hallinum hjá tí almenna stavar frá landskassahallinum.

Samanumtikið benda úrslitini á, at tað tað almenna í 2012 hevði konjunkturjavnað hall á umleið 1% av BTÚ, sum svarar til 100-150 mió. kr. Hetta merkir í stuttum, at hóast vit royna at javna úrslitið hjá tí almenna fyri konjunkturstøðuna, hevur tað almenna kortini hall á umleið 1% av BTÚ. Grundað á eina fyrivarnisreglu, ber ikki til at áseta eitt neyvari konjunkturjavnað úrslit fyri 2012 enn hall á 100-150 mió. kr.

Avgerandi fyri hetta úrslit er sjálvsagt, at eftir valda uppgerðarháttinum var ikki stórur lágkonjunkturur í 2012. Vit kunnu siga, at lítil lágkonjunkturur ella *normalkonjunkturur* var í 2012.

[6] Metingarnar í myndunum 1-4 á bls. 41 taka støði í búskettfaktorinum $\varepsilon$ = 0,64. Í Grønlandi er búskettfaktorurin mettur til um 0,5-0,6 og í Danmark 0,7-0,8. Sí keldur í fótnotu 2.

Inntøkur og útreiðslur hjá tí almenna skulu javnviga yvir longri áramál, tá ið atlit eisini eru tikin at ávirkanini frá konjunkturunum. Gera tær ikki tað, er rikni fíggjarpolitikkurin ikki haldførur yvir longri áramál, við tað at skuldin tá vil halda áfram at vaksa. Fyri haldførið á fíggjarpolitikkinum sum heild, hevur tað størri týdning, at almenna nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja renturnar av almennu skuldini.

**Myndir 1-4. Konjunkturjavnað framleiðsla og konjunkturjavnað úrslit**




Viðm.: Neyðugt er at lesa tølini við tí fyrivarni, at HP-filtrið kann vera óneyvt í endanum á tíðarrøðum. T.d. skulu árini 2001-2002 og 2012 lesast við hesum fyrivarni. Havandi hesi fyrivarni í huga, verður hildið sannlíkt, at konjunkturjavnaða úrsliti fyri tað almenna tilsamans er umleið 1% av BTÚ í 2012, sum svarar til 100-150 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í BTÚ fyri 2012.

[1] Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðsu (í hesum føri bruttovirðisøking) og konjunkturjavnaða framleiðslu í % av konjunkturjavnaðari bruttovirðisøking.

[2] Grundrakstur er í hesum føri almenna úrslitið frádrigið rentur, vinningsbýti og ognarútreiðslur. Uppgerðarhátturin fyri grundrakstur er sostatt ikki sami uppgerðarháttur, sum brúktur verður í Búskaparfrágreiðing II í 2013 frá Fíggjarmálaráðnum, sum varð útgivin í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2014.

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

## Myndir A1-A4. Konjunkturjavnað framleiðsla og konjunkturjavnað úrslit




Viðm.: Neyðugt er at lesa tølini við tí fyrivarni, at HP-filtrið kann vera óneyvt í endanum á tíðarrøðum. T.d. skulu árini 2001-2002 og 2012 lesast við fyrivarni. Havandi hesi fyrivarni í huga, verður hildið sannlíkt, at konjunkturjavnaða úrsliti fyri tað almenna tilsamans er umleið 1% av BTÚ í 2012, sum svarar til 100-150 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í BTÚ fyri 2012.

[1] Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðsu (í hesum føri "lønir og atknýtt gjøld") og konjunkturjavnaða framleiðslu í % av BTÚ.

[2] Grundrakstur er í hesum føri almenna úrslitið frádrigið rentur, vinningsbýti og ognarútreiðslur. Uppgerðarhátturin fyri grundrakstur er sostatt ikki sami uppgerðarháttur, sum brúktur verður í Búskaparfrágreiðing II í 2013, sum varð útgivin í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2014.

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

## Orðalýsingar

**Almenn nettoskuld**
Almenna nettoskuldin fevnir um alla fíggjarliga skuld og áogn í almenna geiranum. Almenna nettoskuldin er øll fíggjarlig skuld í almenna geiranum frádrigið alla fíggjarliga áogn. Fíggjarliga áognin fevnir millum annað um tøka gjaldførið og aðrar fíggjarognir.

**Almennar útreislur tilsamans**
Stórsti parturin av almennu útreiðslunum er almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Í 2011 vóru umleið 86% av almennu útreiðslunum almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Harafturat eru almennu útreiðslurnar íløgur, rentuútreiðslur, stuðulsútreiðslur og aðrar útreiðslur. Landið og kommunurnar stóðu fyri 87% av almennu útreiðslunum í 2011.

**Bruttotjóðarúrtøka, stytt BTÚ**
Bruttotjóðarúrtøka er virðið á samlaðari privatari og almennari framleiðslu frádrigið virðið á ráevnum, vørum og tílíkum, sum verða brúkt í framleiðsluni. Verður eisini nevnt *Gross Domestic Product (GDP)* ella *Bruttonationalprodukt (BNP)*.

**Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum**
Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum er uppgerð av BTÚ, har ið roynt verður at javna gongdina í BTÚ fyri prísvøkstri á ráevnum, vørum og tænastum. Vøksturin í BTÚ í føstum prísum verður vanliga brúktur sum vísital fyri búskaparvøkstur millum lond. Vøkstur í BTÚ í føstum prísum vísir vøkstur í framleiðsluni í mongdum. Verður nevnt *Real GDP* ella *realt BNP*.

**Bruttovirðisøking, stytt BVØ**
Bruttovirðisøking er bruttotjóðarúrtøka frádrigið vøruskattir netto, sum fevna um meirvirðisgjald, punktgjøld og aðrar vøruskattir og vørustudningar. Bruttovirðisøking verður ofta brúkt til at lýsa framleiðsluna býtta á vinnugreinar. Verður nevnt *Gross Value Added (GVA)* ella *Bruttoværditilvækst (BVT)*.

**Fíggjarpolitiskt haldføri**
At fíggjar- og búskaparpolitikkurin er haldførur merkir, at rikni politikkurin hongur saman yvir longri áramál skilt soleiðis, at gongdin í almennu nettoskuldini sum partur av samfelagsbúskapinum er støðug yvir tíð. Hetta merkir, at almennu inntøkurnar kunna fíggja almennu útreiðslurnar og rentuútreiðslur av verandi almennari skuld yvir tíð. Fíggjar- og búskaparpolitikkurin kann sostatt vera haldførur yvir longri áramál, hóast tað almenna hevur hall í fleiri ár, um bara almenna nettoskuldin ikki er støðugt vaksandi partur av samfelagsbúkapinum yvir tíð.

**Konjunkturjavnað alment úrslit**
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið er staðfest alment úrslit javnað fyri ávirkanir frá konjunkturstøðuni á almennar inntøkur og útreiðslur og aðrar ikki varandi og serliga umstøður, til dømis oljuprísir ella serligar íløgur.
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið gevur sostatt eina meira rættvísandi mynd av veruligu gongdini í almenna búskapinum sum heild sammett við staðfesta almenna úrslitið.
Konjunkturjavnaða úrsliti hjá tí almenna verður aðrastaðni vanliga nevnt *Cyclically Adjusted Budget Balances* ella *strukturel saldo*.

**Konjunkturjavnað framleiðsla**
Konjunkturjavnað framleiðsla vísir mettu bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu, har ið roynt verður at javna fyri ávirkanir frá konjunkturunum í samfelagsbúskapinum. Roynt verður sostatt at vísa bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu við normalkonjunkturi í samfelagnum. Í eini støðu við normalkonjunkturi verður ofta sagt, at gongdin í samfelagsbúskapinum samsvarar við javnan vøkstur í prísum og lønum. Í frágreiðingini verður bruttovirðisøking brúkt sum vísital fyri framleiðslu heldur enn bruttotjóðarúrtøku, men hetta hevur ikki stóran týdning fyri úrslitini ella niðurstøður. Verður vanliga nevnd *potential output, potential GDP* ella *strukturelt/potentielt output (BNP).*

**Konjunkturfrávik**
Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðslu og konjunkturjavnaða framleiðslu. Er konjunkturfrávikið størri enn 0, kunnu vit siga, at hákonjunkturur er í samfelagsbúskapinum; trýst er sum oftast á arbeiðsmarknaðinum, lítið av tøkari framleiðsluorku er í samfelagnum, og prísvøkstur er á flestu marknaðum. Er konjunkturfrávikið minni enn 0, kunnu vit siga, at lágkonjunkturur er í samfelagnum, lítið trýst er á arbeiðsmarknaðinum, og tøk framleiðsluorka er í samfelagnum. Konjunkturfrávik verður aðrastaðni ofta nevnt *outputgap* ella *outputgab*.

**Landskassaskuld**
Landskassaskuldin fevnir bara um skuld hjá landinum og harvið ikki um skuld hjá kommunum ella sosialum grunnum. Meginparturin av landskassaskuldini er lánsbrævalán. Landskassaskuldin er sum oftast ein bruttouppgerð av skuldini, har dentur verður lagdur á fíggjarligu skyldurnar hjá landinum (passivsíðuna á fíggjarjavnanum).

**RLÚ-úrslit**
Stytting fyri rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit landskassans. RLÚ-úrslitið er munurin millum landskassans inntøkur og útreiðslur uppgjørt eftir meginreglunum í landsroknskapinum. RLÚ-úrslitið viðvíkur roknskapinum hjá landskassanum.

**Sosialir grunnar**
Hesir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

**Staðfestur almennur grundrakstur**
Staðfestur almennur grundrakstur verður í hesum føri lýstur sum staðfest alment úrslit frádrigið nettorentuútreiðslur (rentuútreiðslur minus rentuinntøkur). Verður vanliga nevnt *General Government Primary Balance* ella *faktisk primær saldo.*

**Staðfest alment úrslit**
Almenna úrslitið vísir avlop ella hall hjá tí almenna og verður lýst sum munurin millum almennar inntøkur og útreiðslur. Uppgerðin fylgir teimum leiðreglum, sum tjóðarroknskapurin verður uppgjørdur eftir. Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkisfyrisitingina og sosialar grunnar. Verður vanliga nevnt *General Government Overall Balance* ella *faktisk offentlig saldo.*

**Staðfest framleiðsla**
Virðið á vørum og tænastum frá marknaðarligari framleiðslu, framleiðslu til egna nýtslu og aðrari framleiðslu, sum ikki er marknaðarlig. Framleiðsla er ikki tað sama sum søla. Til dømis er framleiðsluvirðið í handilsvirki ikki sølan, men sølan minus innkeyp av handilsvørum (bruttovinningur). Í frágreiðingini verður bruttovirðisøkingin úr tjóðarroknskapinum nýtt sum vísital fyri framleiðslu. Bruttovirðisøking ella bruttotjóðarúrtøka verða sum oftast brúkt sum vísitøl fyri framleiðslu. Verður vanliga nevnt *Actual Output* ella *faktisk produktion*.

**Tað almenna**
Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkisfyrisitingina og sosialar grunnar. Heimastýrisfyrisitingin fevnir um landsstovnar, meðan kommunufyrisitingin fevnir um kommunurnar og kommunustovnar. Ríkisfyrisitingin fevnir um donsku ríkistovnarnar í Føroyum, og sosialu grunnarnir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

## Bókmentir

Danmarks Nationalbank. Konjunkturudsving og offentlige finanser. Kvartalsoversigt, 1. kvartal 2011 - Del 1. Ann-Louise Winther, Økonomisk Afdeling. Bls. 71-91. Tøkt á http://www.nationalbanken.dk/C1256BE2005737D3/side/Konjunkturudsving_og_offentlige_finanser!opendocument.

De Økonomiske Råd, Dansk Økonomi Efterår 2013. Tøkt á http://www.dors.dk/sw10885.asp, oktober 2013.

De Økonomiske Råd, Strukturel saldo til Dansk Økonomi, efterår 2012. Tøkt á http://www.dors.dk/sw7987.asp.

European Central Bank. Potential output, economic slack and the link to nominal developments since the start of the crisis. Í ECB Monthly Bulletin, November 2013. Tøkt á http://www.ecb.europa.eu/pub/pdf/mobu/mb201311en.pdf, 2013.

Finansministeriet. Beregning af den strukturelle offentlige saldo. Arbejdspapir nr. 17/2005. Tøkt á http://www.fm.dk/publikationer/arbejdspapirer/2005/arbejdspapir-nr,-d-,-17-2005/~/media/Files/Arbejdspapirer/arbpap1705.ashx, 2005.

Finansministeriet. Budgetoversigt 2, august 2013. Frágreiðing tøk á http://www.fm.dk/publikationer/2013/budgetoversigt-2-aug-13/.

Finansministeriet. Finansministeriets beregning af gab og strukturelle niveauer. Tøkt á http://www.fm.dk/nyheder/pressemeddelelser/2012/11/oversigt-over-oekonomiske-regneprincipper/.

Finansministeriet. Finansredegørelse 2014. Januar 2014. Frágreiðing tøk á http://www.fm.dk/publikationer/2014/finansredegoerelse-2014/.

Grønlands Økonomiske Råd. Økonomisk Råds rapport, 2011. Tøk á http://naalakkersuisut.gl/~/media/Nanoq/Files/Attached%20Files/Finans/DK/Oekonomisk%20raad/100913Oekonomisk_Raads_Rapport_2013_DK%20(1).pdf.

Hagstova Føroya. Tað almenna. Frágreiðing um leiklutin hjá tí almenna í Føroyum. Tøkt á http://www.hagstova.fo/portal/page/portal/HAGSTOVAN/Hagstova_Foroya/tema/TadAlmenna/ta_almenna_2011_0.pdf, 2013.

IMF. Fiscal Monitor. Taxing Times, October 2013. Frágreiðing tøk á http://www.imf.org/external/pubs/ft/fm/2013/02/fmindex.htm, 2013.

OECD. Economics Department Working Paper No. 434, Measuring cyclically-adjusted budget balances for OECD countries, 2005. Tøkt á http://www.oecd-ilibrary.org/docserver/download/5lgpfmjmgp6k.pdf?expires=1383836537&id=id&accname=guest&checksum=4D7141E26B939DD3CE4F64D89EC58033.

OECD. OECD Economic Outlook, Vol. 2008/1, OECD Publishing. Frágreiðing tøk á http://www.oecd-ilibrary.org/economics/oecd-economic-outlook-volume-2008-issue-1_eco_outlook-v2008-1-en, 2008.

Robert Price og T. Dang. Adjusting Fiscal Balances for Asset Price Cycles. OECD Economics Department Working Papers, No. 868, OECD Publishing. Tøkt á http://dx.doi.org/10.1787/5kgc42t3zqkl-en, 2011.

Rådgivende udvalg vedrørende Grønlands Økonomi. Den Økonomiske udvikling i Grønland. Frágreiðing tøk á http://www.stm.dk/publikationer/groenland03/default.htm, 2003.

Økonomi og Indenrigsministeriet. Økonomisk Redegørelse, August 2013. Bls. 155-178. Tøkt á oim.dk/media/510019/%C3%98konomisk%20Redeg%C3%B8relse%20august%202013.pdf.